# FRØÐI

1 / 2021 27. ÁRG.KR. 48,-







## TINGFÓLK EFTIR *egnari* SANNFØRING?




*Les eisini*

NJÓSNARAR SKULDU STEÐGA **FISKIVINNUNI**

**ALDUGJØRT RÁK**
– EIN AVBJÓÐING HAR TAÐ ER ÁBÆRT

BÓKMENTA-UMMÆLINI **FRAM Í LJÓSIÐ**

# Frøði hesaferð!

**Úrvalið av greinum hesa** ferð er býtt sundur í fýra langar og tríggjar stuttar greinar. Tær, sum eru longst í vavi, snúgva seg um søgufrøði, samfelagsfrøði, náttúruvísindi og bókmentafrøði. Tvær av hesum greinum eru sprotnar úr tveimum nýliga vardum ph.d.-ritgerðum. Hesar ritgerðir eru tann eftir Erling Isholm (2020) um amtmansstovnin sum broyting-arambоð hjá fiskivinnuni í 1800-talinum og tann eftir Paulu Gaard (2021) um ein annan nýggjari stovn, sum er føroyski bókmentaummælarastovnurin.

Ein triðja grein, t.e. tann, ið Heðin Abrahamsen skrivar um aldugjørt rák sum avbjóðing í alivinnuni, er eisini ph.d.-evni við tað, at greinin er sprottin úr einari ph.d.-verkætlan, sum er í gerð. Fjórða langa greinin setur spurnartekn við, hvørt nógv tingfólk eru í politikki eftir egnari sannføring og seta trúskapin móti flokkum í aðru røð. Páll Holm Johannesen hevur skrivað, og greinin snýr seg um floksskifti, ið sum skilst vindur upp á seg í føroyskum politikki. Í samsvari við at vit eru farin frá hugmyndafrøði til samleika, gerst flokstilknýtið meira stokkut og skiftandi. Hetta fyribrigdi ger politikk meira litríkan, spontanan og óregluligan, men – sæð frá veljarans síðu – eisini truplari at spáa um. Alt fer ikki fram eftir hugmyndafrøðiligum linjum – heldur ikki í landspolitikki, har flokslinjan annars hevur verið meira stringent enn í kommunalpolitikki.

Stuttu greinirnar snúgva seg um orð og dýr. Hjalmar P. Petersen skrivar um orðið *uppávegin* og Jógvan í Lon um orðini *onk, eymkan og ank*. Orð, sum hava eina merkisverda søgu, sum røkkur langt út um tað reint leksikalska. Høvundarnir tulka orðini, og teir vísa á, hvat teirra hugsan er um uppruna orðanna. Agnes-Katharina Kreiling og Janus Hansen skriva um eitt nýtt tøðklukkuslag, sum er funnið í seyðasparli. Hetta er eitt klukkuslag, sum ikki áður er skrásett í Føroyum, og gevur tað tí eitt íkast til ta vitan, ið vit hava um lívfrøðiliga margfeldið her á landi.

Drama og okkurt óvæntað er í øllum evnunum og í tí stóra sum í tí smáa: í orðalýsingunum, dýralýsingunum, lýsingunum av politikki og aldugjørdum rákum mitt í einari alitíð, í politisku føroysku søguni, sum vit neyvan fyrst og fremst seta í samband við njósning, og í ummælarasøguni, sum hevur karaktermorð og annað gott at bjóða.


FRØÐI 1 / 2021

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.


Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumyndir: Jens Kr. Vang


*Loyvt er at endurgeva úr Frøði,*
*um víst verður til heimildina.*
*Verða heilar greinir endurgivnar,*
*má avtala gerast.*


AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonargøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær
til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundsleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna,
telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða:kr. 5.000,-
Hálv síða:kr. 3.000,-


RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Katrin Hoydal, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan
Unn Patursson, Føroya Landsbókasavn


GRAFISK FRAMLEIÐSLA
OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen


RITSTJÓRN
Bergur Rønne Moberg, *ábyrgd*
Birgitta Andreasen
Erling Isholm
Katrin Hoydal
Kim Bergkvist


FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á kontu í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 19
*Minnist til at viðmerkja navn.*














## Innihald


4 NJÓSNARAR SKULDU STEÐGA FISKIVINNUNI
Erling Isholm

10 TØÐKLUKKUR Í FØROYUM – ÓVÆNTAÐUR FONGUR Í SEYÐASPARLI
Agnes-Katharina Kreiling og Janus Hansen

14 ALDUGJØRT RÁK - EIN AVBJÓÐING FYRI ALING, HAR ÁBÆRT ER
Heðin Abrahamsen

21 TINGFÓLK EFTIR EGNARI SANNFØRING?
Páll Holm Johannesen

32 *UPPÁVEGIN* - KANSKA TAÐ KEMUR FRÁ *UPPÁVEGIN* = 'TUNG'
Hjalmar P. Petersen

34 EIN SØGA UM *ONK, EYMKAN OG ANK*
Jógvan í Lon Jacobsen

39 BÓKMENTAUMMÆLINI FRAM Í LJÓSIÐ
Paula Gaard

44 KORONUGRANSKINGIN
Maria Skaalum Petersen

# NJÓSNARAR SKULDU STEÐGA FISKIVINNUNI



**Erling Isholm**
erlingi@setur.fo
adjunktur í søgu
Fróðskaparsetur Føroya

Summarið 1849 arbeiddu tveir njósnarar fyri handilsforvaltaran í Kongliga einahandlinum. Teirra uppgáva var at fylgja við í øllum, sum fiskavirkarin Holger Jacobæus tókst við. Vónin var at finna okkurt, sum kundi vera grundarlag undir at fáa Jacobæus sagdan úr starvi. Eydnaðist tað at sleppa av við fiskavirkaran, fór at bera til at steðga klippfiskavirkingini aftur. Tað hevði verið ein fongur fyri einahandilin, tí málið við einari mentari fiskivinnu var at fyrireika føroyingar til eina tíð við fríhandli og ongum einahandli.

**Holger Jacobæus kom** til Føroya í apríl 1844, tá ið 130 tons stóra briggin Seyen stevndi inn á Havnarvág. Seyen varð keypt úr trotabúnum eftir handilsmannin J.J. Benedictsen í Vestmannaoyggjum, og endamálið við skipinum var at gera nakrar fiskivinnuroyndir í Føroyum og at læra føroyingar at fiska við skipi. Hetta hevði kongur tikið avgerð um 20. mars 1844. Hans Arreboe Clausen, ið m.a. rak handil í Ólafsvík, varð útnevndur at standa á odda fyri royndunum í Føroyum, og hann setti longu 28. mars Holger Jacobæus í starv. Uppgáva Jacobæusar var at virka tann fiskin, sum Seyen fiskaði, til klippfisk.

Henda kongliga fiskivinnuroyndin var enn ein roynd frá almennu myndugleikunum at seta gongd á eina fiskivinnu í Føroyum við deksførum. Ein grein í handilslógini frá 1790 beyð til, at føroyingar, sum høvdu áhuga fyri at fáa til vegar deksfar til fiskiskap, kundu rokna við at fáa almennan stuðul. Tá ið úthandlarnir hjá kongliga handlinum komu við handilsreglugerðini frá 1836, var eisini ein grein har, sum gjørdi tað møguligt hjá føroyingum at fáa rentufrí lán frá tí almenna til at byggja ella keypa fiskifar. Sostatt vóru stuðulsmøguleikar til staðar, og fleiri royndir vórðu gjørdar, men enn hevði tað ikki eydnast at fáa gongd á fiskivinnuna.



*Pakkhúsið á Viðarnesi. Virkaður fiskur verður blakaður upp á helluna.*



***Klippfiskavirkingin í Álakeri var byrjanin til eina heilt nýggja tíð í Føroyum. Nógv nýggj vinna hevur sín uppruna í teirri menningini, sum lunnar vórðu lagdir undir har. Á myndini eru fleiri stig í hesari menning. Gamla pakkhúsið hjá Jacobæusi, sum hómast millum oljutangarnar og neystini, var byrjanin til vinnuligan útróður. Í neystunum vórðu motorbátar bygdir tíðliga í 20. øld, og tann vinnan mentist til rættiligt skipasmíð, sum sæst fremst í myndini.***

## Velja Álaker

Jacobæus fekk boð um at finna eitt hóskandi stað til virkingina í samráð við amtmannin. Amtmaðurin metti seg ikki vera føran fyri at siga, hvar besta staðið í Havn var at virka fisk, men tá ið teir møttust, gjørdi Jacobæus skjótt av at leggja virksemið í Álakeri. Tað kom væl við hjá amtmanninum, tí álakersbøur hoyrdi til embætisgarð hansara, so har ráddi hann einsamallur.

Tá ið Seyen kom aftur av fyrsta túri sínum, hevði Pløyen amtmaður fingið fatur á nøkrum havnarmonnum, sum skuldu lærast upp. Jacobæus sjálvur og tríggir mans av skipinum løgdu teimum lag á, meðan restin av manningini landaði fiskin. Væl varð arbeitt, tí tveir dagar seinni kundi Seyen fara út aftur at fiska.

Tá ið hetta fyrsta árið við kongligum fiskiroyndum í Føroyum var liðugt, kundi Pløyen amtmaður staðfesta, at klippfiskurin, sum var virkaður í Álakeri, var vøkur og væl hagreidd handilsvøra, og royndirnar høvdu prógvað, at lítið hald var í áhaldandi uppáhaldinum um, at veðurlagið í Føroyum ikki hóskaði til at virka klippfisk.

Hinvegin hevði fiskiskapurin hjá Seyen ikki verið so góður, sum roknað varð við. Meðan Seyen gjørdi sínar royndir, var Fríðrikur krúnprinsur á vitjan í Føroyum. Saman við honum var vinmaður hansara Carl Irminger, sum Irmingarhav er uppkallað eftir. Irminger fylgdi væl við fiskiroyndunum, og hann hevði sínar hugsanir um, hvussu tær kundu gerast øðrvísi árið eftir.

## Keypa trý smærri skip

Ein av hugsanum hansara var, at Seyen var eitt ov stórt skip til føroyska fiskiskapin. Tað rætta hevði verið at nýtt smærri skip. Hesa somu niðurstøðu var Pløyen amtmaður eisini komin til, og bæði H.A. Clausen og Rentukamarið vóru samd. Tí varð Seyen selt, og trý onnur skip keypt til royndirnar í 1845.

Skipini Hanne & Marie og Jylland komu á Havnina 29. apríl, og við sær høvdu tey timbur til eitt pakkhús, sum skuldi setast upp í Álakeri. Pløyen amtmaður og Jákup Nolsøe handilsforvaltari fóru saman við Jacobæusi at finna besta staðið at seta pakkhúsið upp. Teir komu ásamt um, at besta staðið var eitt sindur úti á Viðarnesi, har oljutangar standa í dag.

Kongligu fiskivinnuroyndirnar hildu fram í 1845 og 1846, men tað eydnaðist heldur ikki smærru skipunum at fáa eitt úrslit burtur úr royndunum, sum Rentukamarið í Keypmannahavn var nøgt við.



*Kvinnur og børn í fiski á Viðarnesi, meðan formaðurin heldur eyga við arbeiðinum.*



*Fiskur verður vaskaður.*

Á heysti 1846 avgjørdi Rentukamarið at gevast við royndunum. Fiskivinnuroyndirnar høvdu givið stór undirskot, og ætlanirnar at læra føroyingar at fiska við skipi høvdu ikki givið so nógvan ávøkstur, sum ætlanin hevði verið. Myndugleikarnir í Keypmannahavn ætlaðu ikki at gera meira við at menna eina føroyska fiskivinnu.

## Útróðrarmenn avreiða í Álakeri

Pløyen amtmaður og Lunddahl fúti vóru púra ósamdir í hesi niðurstøðuni hjá Rentukamarinum, tí teir vóru samdir um, at kongligu fiskivinnuroyndirnar høvdu havt stóra ávirkan rætta vegin. Eitt var, at føroyingarnir, sum høvdu roynt seg umborð á skipunum, høvdu víst, at teir eftir stuttari tíð megnaðu at gerast bestu fiskimenn umborð. Harumframt gjørdist tað greitt, at fiskavirkingin í Álakeri var eitt avgerandi vegamót í føroyskari vinnusøgu, tí hon hevði víst, at tað bar væl til at virka fyrsta floks klippfisk í Føroyum.

Uppaftur størri týdning hevði tað, at føroyskir útróðrarmenn tvey tey síðstu árini høvdu fingið møguleikan at avreiða ráfisk í Álakeri, sum teir fingu pening í hondina afturfyri. Hetta var ein kærkomin møguleiki at fáa vinning burtur úr summarfiskinum, sum annars bara varð brúktur til døgurðamat. Umframt havnarmenn komu bátar úr fleiri bygdum til Havnar at avreiða til Jacobæus í Álakeri. Sostatt var støðan á heysti tann, at embætismenn í Keypmannahavn hildu, at kongligu fiskivinnuroyndirnar vóru miseydnaðar, men donsku embætismenninir í Havn hildu, at tær høvdu verið ein sonn kollvelting.

Orsøkin til hesa ójøvnu meting var, at klippfiskavirking ongantíð hevði verið málið við kongligu fiskivinnuroyndunum. Hon var tí heldur ikki tald við, tá ið Rentukamarið gjørdi støðuna upp. Fyri útróðrarmenn og mong havnarfólk var tað júst fiskavirkingin, sum var kollveltandi, men tað hevði minni týdning, um fiskurin var fiskaður av útróðrarmonnum ella fiskimonnum á skipi.

## Kongligi einahandilin yvirtekur fiskavirkingina

Rentukamarið ásannaði, at møguleikin at avreiða var ein kærkomin møguleiki hjá útróðrarmonnum, og tí varð starvstíðin hjá Jacobæusi longd fram til 1. november 1848, men frá 1. januar 1847 skuldi tað vera Kongligi einahandilin, sum rindaði løn hansara og tók sær av øllum øðrum útreiðslum.

Einahandilin hevði lítlan áhuga fyri at taka sær av fiskavirkingini, tí hann helt ikki, at yvirskotið av søluni av fiskinum á keypsskálanum í Keypmannahavn var nóg stórt til at gjalda fyri allar tær útreiðslur, sum vóru av flutningi, pakkhúsplássi og trygging. Nevndin fyri handlinum vildi tí kanna, hvussu fiskavirkingin kundi umskipast, tá ið Jacobæus varð uppsagdur 1. november 1848. Øll politiska umsitingin í Keypmannahavn varð kollvelt júst hesar mánaðirnar, so tað varð nýggja Innanríkisráðið, sum 3. mars 1849 sendi amtmanninum ætlanina um, hvussu fiskavirkingin í Føroyum skuldi skipast frameftir.

Ein meginregla í nýggju skipanini var, at amtmaðurin og handilsforvaltarin í felag skuldu taka allar avgerðir viðvíkjandi fiskavirkingini. Tað var heppið, tí skjótt kom undan kavi, at amtmaðurin og handilsforvaltarin ikki drógu eina línu í málinum um fiskavirkingina. Í fyrstu syftu samdust Jákup Nolsøe, handilsforvaltari, og Lunddahl, sum var virkandi amtmaður, tó um at seta Jacobæus aftur í starv og at orða eina reglugerð, sum hann skuldi arbeiða eftir.



*Klippfiskavirking á Viðarnesi og stórum parti av Álakersbønum.*

Lunddahl var virkandi amtmaður, tí Pløyen kom ongantíð aftur til Føroya, eftir at hann hevði umboðað Føroyar í grundlógargevandi tinginum. Nýggjur amtmaður varð settur tíðliga í 1849, og 4. juli 1849 kom Dahlerup til Føroya á fyrsta sinni. Dahlerup sá skjótt, at einki var gjørt fyri at víðka um møguleikarnar at taka ímóti ráfiski til virkingar, tá ið hann kom til landið. Hann fekk óteljandi áheitanir um at gera møguleikarnar betri, og hann legði skjótt til merkis, at framleiðslan kundi økjast munandi, um suðuroyingar og norðoyingar fingu møguleika at avreiða.

## Dahlerup vildi víðka um fiskivinnuna

Tá ið Dahlerup orðaði uppskot síni fyri handilsstjórnini í Keypmannahavn og Innanríkisráðnum, vóru myndugleikarnir lítið áhugaðir í at stuðla honum. Handilin helt seg ikki kunna taka ímóti meira fiski, sum nú var, og eingin áhugi var fyri at brúka pening til íløgur, tí fríhandilin var ikki so langt burturi. Í fyrstu syftu helt amtmaðurin, at tað serliga var Innanríkisráðið, sum ikki vildi stuðla ætlanum hansara um m.a. at byrja at taka ímóti fiski í Klaksvík. Hann trúði eitt sindur meir upp á Handilsstjórnina í Keypmannahavn, tí hann helt, at hon var ávirkað av neiliga hugburðinum hjá handilsforvaltaranum, og um hann fekk greitt Handilsstjórnini frá rætta samanhanginum, fór hon at stuðla sær.

Í skrivi til Handilsstjórnina vildi amtmaðurin vera við, at tað vóru privat peningalig áhugamál, sum gjørdu, at handilsforvaltarin helst ikki vildi hava, at meira varð gjørt við at menna klippfiskavirkingina. Handilsforvaltarin vann nógvan pening við turra fiskinum, tí tá ið turrur fiskur varð seldur til einahandilin, skuldi ein yvirvekt leggjast oman á avreiddu vektina. Endamálið við yvirvektini var at forða fyri, at einahandilin hevði tap av møguligum svinni. Gjørdist greitt, at minni svinn var, enn roknað varð við, so átti handilsforvaltarin alt virðið á yvirvektini. Tá ið talan var um allan tann turra fiskin, sum føroyingar avreiddu í handlinum, kundi tað gerast til fleiri túsund ríkisdálar um árið. Sambært amtmanninum var tað hesin persónligi vinningurin, sum gjørdi, at handilsforvaltarin ikki var áhugaður í at menna nýggju fiskivinnuna.

## Njósningin avdúkað

Dahlerup merkti beinanvegin, ið hann kom til Føroya, at Nolsøe handilsforvaltari hevði eitt horn í síðuni á Jacobæusi, tí hann tosaði áhaldandi ilt um hann. Av tí sama fylgdi amtmaðurin serliga væl við virkseminum í Álakeri. Tað kom væl við, tí tað gjørdist greitt, at handilsforvaltarin hetta sama árið hevði fingið loyvi frá Handilsstjórnini til at seta í starv tveir mans, sum skuldu njósnast fyri handilin og boða frá øllum tí, ið teir funnu út av Jacobæusi viðvíkjandi. Menninir vóru Poul Joensen Nolsøe, sum var húskallur hjá Jacobæusi, og Zacharias Antoniussen, sum arbeiddi í fiskinum. Gjøgnum teir báðar fann handilsforvaltarin fram til ymisk atfinningarsom viðurskifti hjá Jacobæusi, og á vári 1850 var hann klárur við langari klagu um fiskavirkaran.

Amtmaðurin hvakk við, tá ið hann frætti um njósningina, og hann ivaðist ikki í, at tað mátti vera ein misskiljing, tá ið sagt varð, at Handilsstjórnin hevði givið loyvi til, at ein húskallur varð settur at njósnast um húsbónda sín. Men hann mátti ásanna, at soleiðis var støðan, tí lønin hjá njósnarunum stóð í roknskapinum.

## Njósningin kostaði Jákupi Nolsøe starvið

Tann 20. juni 1849 skrivaði amtmaðurin eitt sera atfinningarsamt bræv til Innanríkisráðið. Í brævinum boðaði hann frá, at eingin orsøk var at rættarsøkja Jacobæus. Tvørturímóti var tað handilsforvaltarin, sum eftir øllum at døma vildi gera nógv fyri at steðga menningini av klippfiskaframleiðsluni. Sambært amtmanninum kundu bara vera tvær orsakir til hesa mótstøðuna hjá handilsforvaltaranum. Onnur var, at hann hevði stóran persónligan vinning av søluni av turrum fiski, og tann sølan fór at minka, tá ið klippfiskavirkingin øktist. Hin orsøkin var „den for gamle Folk ikke ualmindelige Uvillie mod Indførelsen af nye Foranstaltninger".

Tríggjar dagar eftir, at amtmaðurin skrivaði atfinningarsama brævið til Innanríkisráðið, kundi hann boða frá, at handilsforvaltarin hevði avgjørt at fara við handilsskipinum Hector til Danmarkar, tí hann ætlaði at søkja um at sleppa úr starvi sínum. Tað kann illa tulkast á annan hátt, enn at njósningin, sum hevði til endamáls at fella Jacobæus, gav baksláttur og hevði við sær, at handilsforvaltarin kendi seg noyddan at leggja frá sær.

Í kopibókini hjá amtmanninum sæst, at hesin veruleikin onkursvegna hevur verið verdur at krógva, tí dagfestingin og journalnummarið á brævinum, har amtmaðurin boðar frá, at handilsforvaltarin hevur gjørt av at siga seg úr starvi, er broytt. Upprunaliga varð brævið skrivað 25. juni 1850, og tað fekk nummar 501, men seinni hevur onkur so roynt at broytt tølini, soleiðis at tað skuldi síggja út til, at brævið varð skrivað 15. juni og hevði journalnummar 495. Á tann hátt bar til at siga, at handilsforvaltarin hevði sagt seg úr starvi, áðrenn amtmaðurin skrivaði atfinningarsama brævið 20. juni. Nær, hví og hvør hevur gjørt hesa sjáldsomu falsanina í kopibókini hjá amtmanninum, er óvíst. Hinvegin var tað greitt, at Dahlerup amtmaður vardi Jacobæus og fiskavirkingina so væl í 1850, at tað ikki eydnaðist Jákupi Nolsøe handilsforvaltara og Handilsstjórnini í Keypmannahavn at steðga menningini av teirri vinnuni, sum longu tá var væl á veg at gerast landsins týdningarmesta vinna.



*Í kopibókini hjá amtmanninum varð hetta brævið upprunaliga skrivað 25. juni 1850 , men seinni er dagfestingin broytt til 15. juni, og brævið hevur eisini fingið journalnummar 495 heldur enn 501, sum tað átti at havt.*



*Fiskur og fiskastakkar kring pakkhúsið á Viðarnesi. Omanfyri sæst Hornagarðurin, sum hoyrdi til amtmansembætið.*




**Heimild:**
Isholm, Erling. 2020. Fiskivinnan sum broytingarboð hjá amtmanninum. *Annales societatis scientiarium Færoensis* 70. Fróðskapur. Tórshavn.

# TØÐKLUKKUR Í FØROYUM

## – óvæntaður fongur í seyðasparli

Onkuntíð kanst tú gera vísindaliga viðraking í seyðasparli. Soleiðis var tað eisini fyrr í ár, tá ið lívfrøðingar á Tjóðsavninum kannaðu seyðasparl úr Koltri. Tá gjørdist greitt, at nakrar av tøðklukkunum, ið teir komu fram á, ikki hoyrdu til nakað av teimum trimum sløgunum, sum áður eru skrásett í Føroyum. Nærri kanningar vístu, at hesar klukkurnar vóru av slagnum *Aphodius borealis*, og fekk slagið føroyska navnið norðurtøðklukka. Umframt tað eru trý onnur sløg av tøðklukkum kend í Føroyum, og tey eita roðatøðklukka (*Aphodius lapponum*), koltøðklukka (*Aphodius ater*) og svávultøðklukka (*Aphodius foetidus*).



**Agnes-Katharina Kreiling**
agnes@savn.fo
lívfrøðingur
Landdjóradeildin
Tjóðsavnið



**Janus Hansen**
janus@savn.fo
savnsvørður
Landdjóradeildin
Tjóðsavnið

### Skrásetingar av tøðklukkum í Føroyum

Síðstu ferð, ið tøðklukkur vóru savnaðar og skrásettar í Føroyum, var í bókaverkinum „Zoology of the Faroes“ frá 1937. August West nevnir har koltøðklukku og svávultøðklukku úr Trongisvági, og eisini roðatøðklukku úr Tórshavn og av Strondum, umframt Trongisvági. Tær vóru helst allar savnaðar um 1925-26.

Tær fyrstu skrásetingarnar vóru í 1881, tá ið Hans Jacob Hansen gav út „Faunula insectorum Faeroeensis“. Árini ímillum 1881 og 1937 vórðu tøðklukkur nevndar í fimm greinum. Aftur at hesum fáu skrásetingunum eru eintøk av tøðklukkum til skjals í skordýrasavninum hjá Tjóðsavninum, sum eru savnað árini 2004 til 2012. Tær eru úr Streymoy, Mykinesi, Skúgvoy og Vágum. Harumframt vóru leivdir av tøðklukkum funnar í fornleivdum úr Tjørnuvík frá uml. ár 650.

Lítið er at ivast í, at tøðklukkur eru vanligar og um allar Føroyar, men tað hevur ikki verið gjørt nógv við at rannsaka hetta. Tískil er eingin orsøk at halda, at slagið, norðurtøðklukka, ið nú er rakt við, nýliga er komið higar. Heldur hevur henda tøðklukka verið her í longri tíð, uttan at lívfrøðingar hava lagt hana til merkis.



*Tøðklukkur á skordýrasavninum hjá Tjóðsavninum. Mynd: Janus Hansen*

### Lívfrøðin hjá tøðklukkum

Lítlar tøðklukkur (Aphodiinae) finnast víða um í heiminum. Tær eru ein stórur bólkur av sløgum í ættini Scarabaeidae við uml. 3300 sløgum. Á evrasiska økinum eru fleiri enn 1200 sløg skrásett.

Kropslongdin er 2,5 til 13 mm, so hesar klukkurnar eru lítlar ella hava miðalstødd. Tær eru eyðkendar við at vera avlangar og rundleittar. Harumframt eru ytstu liðirnir á kampunum munandi breiðari enn teir innaru. Eisini hava tær breið bein við píkum og tonnum. Navnið tøðklukka vísir sera væl, hvussu stóran týdning tøð hava fyri hesar klukkur. Flestar teirra liva í skarni undan ymsum plantuetandi súgdýrum, eitt nú neyti, rossi, seyði og hjørti.

Vaksnu klukkurnar eta feskt skarn, sum kvennklukkurnar eisini víggja í. Ormverurnar liva síðan væl av hesum føðsluríka tilfari, sum er allastaðni rundan um tær.

Sum heild eru tøðklukkur virknar summarmánaðirnar og liggja í dvala í jørðini um veturin.



*Koltøðklukka á sínum natúrliga búøki, t.e. feskum seyðasparli. Mynd: Janus Hansen*



*Koltøðklukka (Aphodius ater). Mynd: Janus Hansen*

Sum skilst, er skarn eitt virðismikið tilfeingi hjá eini tøðklukku, men tað er stokkut og spjatt. Hon noyðist at finna hetta tilfeingið, meðan tað enn er feskt og átuligt, og helst áðrenn ov nógv onnur skordýr hava leitað sær búgv har, eitt nú køstaflugur og skildisklukkur. Tøðklukkur eru væl tillagaðar hesi kapping við góðum eginleikum at flúgva, og tær hava altíð eyguni eftir, um hóskandi djóratøð eru at finna.

Tað merkir tó ikki, at tøðklukkur ikki eru kræsnar. Einstøk sløg eta einans rossamykju, og onnur, eitt nú koltøðklukka og norðurtøðklukka, vilja helst matla sær við seyðasparli.

## Gera heimin reinari

Í okkara oyrum ljóðar tað ólekkurt at eta sparl og mykju, men tøðklukkur og onnur ryggleys dýr, sum eta slíkt, eiga stóra tøkk uppiborna.

Sama hvar fólk hava sett seg niður, hava tey havt húsdjór við sær, og ofta hava tey verið nógv í tali. Í Føroyum eru tað einar 70.000 ær, og hvør teirra letur frá sær sparl, sum svara til 5% av kropsvektini – hvønn dag! Tú kanst lættliga hugsa tær, at vit høvdu øll verið undir í sparli, um hesi vælsignaðu skordýrini ikki vóru so íðin.

Í Avstralia lærdu fólk týdningin av tøðklukkum av ringum royndum. Tøðklukkurnar har eru vanar við tað heldur turra skarnið undan wombat, kenguru og øðrum dýrum, sum hoyra heima har. Tær avstralsku tøðklukkurnar halda ikki, at neytamykja er nakað fyri tær. Neytalandbúnaðurin í Avstralia tók dik á seg mitt í tjúgundu øld, og beitilendini fyltust skjótt við neytamykju, so stór øki vóru ikki nýtilig sum bit. At enda var støðan so mikið ring, at avgjørt varð at innflyta tøðklukkur úr Afrika, so sleppast kundi av við neytamykjuna. Afrika er tann heimsparturin við mest fjølbroyttum hóvdýrasløgum, og Afrika hevur eisini største fjølbroytnið, tá ið tað snýr seg um tøðklukkur. Í eini mykjuløgu í Afrika kunnu tað vera heili 60 sløg av tøðklukkum.

## Lívfrøðiliga margfeldið í Koltri

Tað eru fýra sløg av tøðklukkum í Føroyum, so í sambandi við fjølbroytni liggja Føroyar ikki ovarlaga í heimshøpi. Einastu stóru súgdýrini í Føroyum eru seyður, ross og neyt, og tøðklukkurnar, sum liva her, eru knýttar at júst teirra skarni.

Tær fimtan lívverurnar av norðurtøðklukku úr Koltri vórðu savnaðar longu í juni 2019. Men tað tekur tíð at flokka tílíkt tilfar, ið er savnað á rannsóknum, og enn longri tíð tekur tað at eyðmerkja sløgini. Tí var tað, at hetta slagið ikki varð avdúkað fyrr enn fyrst í hesum árinum.

Tjóðsavnið er nú farið undir eina umfatandi rannsókn av lívfrøðiliga margfeldinum í Koltri. Tey næstu trý árini fara lívfrøðingar at royna at skráseta øll sløg av plantum, fuglum og skordýrum í oynni. Henda framsøkna ætlan hevur fingið fígging frá danska Aage. V. Jensens grunni og verður støði undir eini langtíðarskráseting av lívmargfeldi í Føroyum. Er tað nakað, ið norðurtøðklukkan hevur lært okkum, so er tað, at vit hava framvegis nógv at læra um føroysku náttúruna.



*Norðurtøðklukka (Aphodius borealis), ið er tað slagið, sum varð funnið herfyri. Mynd: Agnes-Katharina Kreiling*

# ALDUGJØRT RÁK

## – ein avbjóðing fyri aling, har ábært er

**Alda og aldugjørt rák hava seinastu árini verið alivinnuni dýr. Í 2016 misti alibrúkið á Sandsvág næstan allan laksin í øðrum ringinum, og í fjør misti alibrúkið í Froðba allan laksin í flestum av teimum 14 ringunum – í báðum førum tí at stór alda breyt tvørtur um boðar og grynnur. Fyri kortum hevði høg alda við sær, at fóðurflakin Hellutangi, sum lá fyri akkeri á Víkum, sleit og rak á land, har hann liggur enn. Slík óhapp eru bæði sera kostnaðarmikil og kunnu vera til bága fyri umhvørvið. Tí er neyðugt, at øki, har ætlanin er at ala, verða sera gjølla kannað. Til ber at máta á einum stað í øllum veðri og máta eitt heilt øki í góðum veðri. Men fyri at kanna eitt heilt øki í øllum veðri er neyðugt at gera ein teldumyndil av økinum.**



**Heðin Abrahamsen**
hedin@fiskaaling.fo
verkfrøðingur
ph.d.-lesandi
Fjarðaelvi
P/F Fiskaaling

**Um miðjan desember 2016** doyði nakað av laksi í alibrúkinum á Sandsvág. Veðrið hevði verið vánaligt av útsynningi við brimi undir Sandslíð, og Boðin hevði brotið. Eina viku seinni var eisini høg alda av útsynningi, og tá var fellið eisini størri enn vanligt. Veðrið um jólini gjørdist eisini vánaligt.

Um middagsleitið tann 20. desember var vindurin øktur til 30 m/s av útsynningi, og Vestanboyan, sum Landsverk hevur á landgrunninum vestanfyri, vísti, at alduhæddin Hm0 var økt til 12,5 m av útsynningi. Út á náttina makaði hann vindin, og aldan minkaði niður á einar 8 m.

Seinnapartin tollaksmessudag øktist alduhæddin aftur upp um 10 m. Beint fyri midnátt var Hm0-alduhæddin mátað til 18,2 m av útsynningi vestri, og hon fór ikki niður um aftur 10 m fyrr enn út ímóti kvøldi jólaaftan.

Longu dagin eftir, um middagsleitið jóladag, fór aldan aftur at økjast og helt seg oman fyri 9 m heilt til seint seinnapartin 2. jóladag. Tá ið aldan var hægst í hesum storminum, var hon um 15 m av vestri. Stormurin var sostatt sera drúgvur, útivið 36 tímar.

### Stórt felli av aldugjørdum ráki

Tá ið Mowi (tá: Marine Harvest) fór undir at fyrireika eina roynd at ala á Sandsvág, varð greitt, at økið var meira ábært fyri aldu og ráki enn aliøki, sum tá vóru tikin í brúk. Heitt varð á Fiskaaling um at gera mátingar á økinum bæði fyri og undir royndini, tí tað var týdningarmikið at tryggja so væl, sum til bar, móti óhappum, og um óhapp hendu, so at vita orsøkina.

Á heysti 2015 varð ein tómur ringur lagdur á økið. Ein alduboya við streymmátara varð løgd nær-indis ringinum. Trýstmátarar vórðu settir á nótina fyri at vita, um nótin varð lyft upp í sjógvin. Eftir tann fyrsta veturin varð avgjørt at hava meira vekt í søkkringunum og at flyta aliringarnar longri inn.

Annar veturin var serstaka harður, sum greitt er frá omanfyri. Eftir at stórur partur av laksinum doyði síðst í desember 2016, varð tað, sum eftir var av laksinum, tikið. Tað vísti seg, at vøksturin hevði verið avbera góður. Mátitólini, trýstmátarar á nótini og streymmátari á botni vórðu tikin inn og avlisin. Kanningarnar vístu, at í illveðrinum við



**Mynd 1.** *Tað brýtur um Boðan, og brim er undir Sandslíð. Mynd: Allin Simonsen.*

**Mynd 2.** *Farmynd av rúminum í nótini tann 20. desember 2016 klokkan 23:17. Vinstrumegin í miðal fyri hvørt korter í 36 h, og høgrumegin í eitt korter mátað hvørt sekund.*




høgari aldu vestanífrá varð nótin lyft upp í sjógvin. Rúmið í nótini minkaði nógv heilt skjótt.

Á mynd 2 til vinstru sæst, at rúmið í nótini er minni enn vanligt í eitt samdøgur, og til høgru sæst, at tá ið rúmið var minst, var tað minni enn 50 %. Eisini sæst, at broytingarnar hendu sera skjótt. Á mynd 3 eru tekningar av nótini við støði í tí, ið trýstmátararnir vístu.

## Hvat var tað so, sum lyfti nótina upp?

Um rákið er nóg hart, er tað ført fyri at lyfta nótina upp. Er alda, skal minni rák til, og um rák og alda fara sama veg, gerst støðan verri.

Á mynd 4 er streymferð og alduhædd, har aldu-boyan lá, avmyndað saman. Tað rættiliga stóra samsvarið vísir, at rákið er komið av alduni. Eisini vísir myndin, at aldan kemur úr ættum millum 150° og 200°, t.e. at aldan í stóran mun kemur frá Boðanum og inn á vágna. Streymurin fer í ymsar ættir alt eftir sjóvarfallinum, men í illveðri, tá ið hart rák tekur seg upp, er kósin uml. 120°, sum er út eftir vágni.

Streymmátarin á botni stóð nakað innari, og eru mátingarnar frá honum vístar á mynd 5. Her sæst, at streymferðin var oman fyri 80 cm/s, tá ið rákið var harðast; tað svarar til 1,6 míl/h. Eisini her sæst, at í góðum veðri fer rákið í ymsar ættir, alt eftir sjóvarfallinum, men í illveðri við høgari aldu rekur í uml. 50°, t.e. tað kemur frá Boðanum.

Broytingarnar í rúminum í nótini hendu skjótt; tað tók bert fáar minuttir at lyfta nótina upp. Streymmátarin á botni mátaði miðalstreymferð í eitt skeið á 10 minuttir, og tí bar ikki til at síggja broytingar í streymferð, sum tóku 1-5 minuttir. Eftir nýggjár vórðu tríggir streymmátarar settir út á botni, ið mátaðu miðalstreymferð í 30 sekund. Tær mátingarnar vístu, at streymferðin kundi vera oman fyri 2 míl/h.

Tá ið streymferðin fer upp um ta ferð, ið laksurin er førur fyri at svimja, verður laksurin kroystur út í netið í nótini. Laksurin klárar at svimja skjótt eina løtu, men tá ið rákið er so hart so leingi, sum tað var í illveðrunum á Sandsvág í 2016, so lúgvast laksurin. At rúmið í nótini minkar, ger støðuna enn verri. Tá ið laksurin kemur at netinum í nótini, fær hann roðsluskaðar og doyr nakrar dagar seinni.

Alibrúkið á Sandsvág er nú flutt enn longri inn fyri ikki at verða rakt av tí aldugjørda rákinum.

### Mát fyri alduhædd og aldutíð

$H_s$: Signifikant alduhædd er alduhæddin, sum vanliga verdur brúkt til at lýsa, hvussu høg aldan er. Havalda hevur nógvar ymiskar aldur í sær. Tí var vanligt at máta í eitt tíðarbil, hvussu høgar aldurnar vóru á einum stað, og so taka miðalhæddina av teimum, sum vóru í tí hægsta triðinginum. Í dag verður ofta meint við *H*m0, tá ið sagt verður signfikant alduhædd.

$H_{m0}$: Signifikant alduhædd. Verður nú á døgum brúkt til at lýsa alduhædd. Verður roknað eftir einum hagfrøðiligum frymli (4 ferðir kvadratrótina av víddini undir orkuspektrinum).

$H_{max}$: Størsta alduhædd er tann størsta einstaka aldan mátað í mátitíðarskeiðinum.

$T_p$: Peak-perioda. Er tíðin á tí aldulongd, sum hevur mest orku.

$T_z$: Er miðaltíðin millum, at vatnskorpan fer frá at vera yvir miðalhædd til at vera undir miðalhædd.

**Mynd 3.** *Tekningar av nótini tann 20. desember 2016 klokkan 23:17. Tað eru 30 s ímillum hvørja mynd, so myndaraðin vísir gongdina í 3,5 minuttir.*







**Mynd 9.** *Dronumynd. Aldan spjaðir seg sum ringar inn eftir vágni. Mynd: Mowi.*

## Aldan minkar aftan fyri grynnur, sum bróta, men kunnu gera rák

Tað verður alt á flestøllum vardum økjum í Føroyum. Tað hevur við sær, at fyri at vaksa royna alarar at fara á meira óvard og ábær øki. Øki kunnu vera ábær fyri ráki, høgari aldu ella bæði.

Tá ið leitað verður eftir nýggjum økjum at ala á, verður hugt eftir einum øki við ikki ov hørðum ráki og sum heldur ikki hevur ov høga aldu. Á mynd 6 er eitt kort við harðasta sjóvarfalsráki, og á mynd 7 er eitt kort, sum vísir, hvussu høg aldan kann væntast at gerast í einum 10 ára skeiði.

Mowi gjørdi í 2014 av at fara at kanna, um til ber at ala á Sandsvág. Hetta átti at borið væl til, tí sjóvarfalsrákið er spakt, og aldan inni á vágni er ikki hægri enn aðrastaðni, har alt verður. Tað kom tí óvart á, at hart rák kom av alduni. Á mynd 8 er gjørd ein einføld tekning av eini høgari aldu, sum rakar Boðan og síðani spjaðir seg inn eftir vágni. Á mynd 9, sum Mowi hevur tikið við eini dronu, sæst, hvussu aldan spjaðir seg sum ringar inn eftir vágni.

Tá ið alda ferðast á opnum havi, ferðast sjógvurin ikki, men flytur seg í rundingar, sum víst á mynd 10. Aldan røkkur uml. hálva aldulongd niður í sjógvin; gerst tað grynri enn tað, røkkur hon niður á botn, og tá fer sjógvurin at flyta seg frameftir og kann gera eitt rák. Á Sandsvág skapa brotini um Boðan eitt rák, sum fer sum ein ál inn á vágna. Sjógvurin má út aftur, og tí kemur eitt rák út við eystara landinum. Eisini kemur eitt rák vestureftir fram við sandinum; hetta er væl kent heima á Sandi (munnliga eftir Ásmundi Johannesen). Á mynd 11 et streymurin teknaður inn.

## Eisini onnur øki hava merkt til rák av aldu

Tá ið Luna kannaði, um til ber at ala á Víkum, vístu




*Mynd 4.* *Ovast eru streymferð og alduhædd avmyndað saman, niðast eru streymkós og alduætt avmyndað saman.*

mátingar, at tá ið alda rakti eina grynnu vestanfyri, har ætlanin var at leggja alibrúkið, gjørdi hon eitt rák, sum fór fram við landinum og víðari fram við sandinum. Tí varð alibrúkið lagt longri úti. Annað er, at tá Hellutangi sleit, kann ein viðvirkandi orsøk vera, at tá ið aldan gjørdist so høg, var hon eisini so long, at hon rakk niður á botn. Tí gjørdist hon brattari og fór at flyta sjógv inneftir, og tí gjørdust kreftirnar størri, enn akkersskipanin helt til. Á mynd 12 er ein leyslig tekning av rákinum. Um mánaðarskiftið februar-mars 2020 varð alibrúkið í Froðba rakt av illveðri við høgari aldu av eystri í fleiri dagar. Eystanboyan hjá Landsverki mátaði eitt skifti alduhæddina Hm0 oman fyri 10 m av eystri, og í einar 2 dagar var alduhæddin Hm0 oman fyri 6 m. Tað vóru 14 ringar, og tá ið avtornaði, var allur laksurin í teimum flestu ringunum deyður. Bara teir innastu ringarnir sluppu undan. Mett varð, at Bakkafrost hevði mist um eina millión laksar (https://www.fishfarmermagazine.com/news/-storms-cost-bakkafrost-a-million-salmon/). Hvør orsøkin var til stóra fellið, er ikki greitt, tí eingin streym- ella aldumáting var á økinum. Tó vísa eldri mátingar á økinum samanhang millum aldu og rák, og tí er sannlíkt, at




**Mynd 6.** *Harðasta sjóvarfalsrák. (Simonsen og Niclasen, 2021)*




*Mynd 10.* *Sjógvurin fer ikki við alduni, men fer í ein runding á staðnum. Aldan røkkur um eina hálva aldulongd niður í sjógvin. Mynd: https://rwu.pressbooks.pub/webboceanography/chapter/10-1-wave-basics/*





**Mynd 7.** *Mett hægsta alda í einum 10 ára skeiði, t.e. hvussu høg aldan hagfrøðiliga kann gerast eina ferð hvørt 10. ár. (Simonsen og Niclasen, 2021)*




**Mynd 8.** *Aldan, ið kemur inn millum Salthøvda og Skúvoynna, brýtur um Boðan. Teknað á mynd hjá Knud Simonsen.*

aldugjørt rák var orsøkin. Á mynd 13 er ein leyslig tekning av, hvønn veg rákið møguliga fer; ongar mátingar eru.

## Neyðugt er við einum teldugjørdum myndli

Hendingin í Froðba var heilt óvæntað, tí har høvdu alibrúk ligið í fleiri ár uttan trupulleikar. Tað ber ikki altíð til at siga, hvussu rákið fer at vera út frá mátingum, tí tað krevur, at alduhæddin í mátitíðarskeiðinum er nóg stór. Til ber at máta sjóvarfalsrákið við at sigla runt á einum øki í góðum líkindum, og til ber at máta rákið á einum stað í ringum veðri, men fyri at siga, hvussu alda og rák hátta sær í øllum líkindum, eisini líkindum, sum bert koma fyri eina ferð hvørt 10. ella 50. ár, er neyðugt at gera ein teldumyndil av økinum.

Fiskaaling hevur gjørt av at menna ein myndil til at rokna aldugjørt rák. Vit hava mátað streym og aldu á Sandsvág síðani 2014, og tí eru nógvar mátingar at halda upp ímóti einum slíkum myndli. Sostatt verður myndilin mentur til at kunna endurgeva tað, sum mátingarnar á Sandsvág vísa. Seinni er ætlanin at flyta vitanina frá Sandsvág til onnur ábær øki, sum t.d. Víkar og Froðba, men eisini onnur øki kunnu koma upp á tal.

Verkætlanin verður skipað sum ein vinnulig ph.d.-verkætlan á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya í samstarvi við Daltares, sum er ein granskingarstovnur í Hollandi við serfrøðingavitan í at gera myndlar av aldu og ráki tætt undir landi.

Innovationsfonden, Betri Stuðulgrunnurin, Mowi og Føroyagrunnurin veita verkætlanini fíggjarligan stuðul.




**Mynd 5.** *Mátingar við streymmátara á botni.*

**Mynd 11.** *Rákið, ið brotini um Boðan gera, fer inn eftir vágni og út aftur hinumegin. Eisini tekur eitt rák seg upp vestureftir fram við sandinum.*




**Mynd 12.** *Tá alda, sum kemur úr útnyrðingi, kemur inn á grunt vatn, ger hon eitt rák fram við landi og víðari fram við sandinum.*







**Mynd 13.** *Tá ið alda brýtur á grynnuni út fyri Skarvatanga, ger hon eitt rák. Brúni pílurin vísir, hvørja leið rákið møguliga fer; mátingar eru ikki gjørdar.*

**Keldur:**

Simonsen, Knud og Bárður A. Niclasen (2021). „Analysis of the energy potential of tidal streams on the Faroe Shelf". Í: *Renewable Energy* 163, ss. 836–844. ISSN: 0960-1481. DOI: https://doi.org/10.1016/j.renene.2020.08.123.





# TINGFÓLK EFTIR *egnari* SANNFØRING?

Í 2011 var ein klumma at lesa á heimasíðuni hjá Sprotanum. Ein veljari segði frá, at hann tey seinastu trý løgtings- og kommunuvalini hevði valt tjóðveldismenninar Karsten Hansen, Sjúrð Skaale og Boga Andreasen. Seinni valdu allir at skifta flokk.



**Páll Holm Johannesen**
pall.holm.johannesen@gmail.com
samfelagsfrøðingur

> *„Tað er margháttlig støða. Eg havi valt ein politikk, politikkin hjá Tjóðveldi. Havi fingið tjóðveldispolitikk, sambandssinnaðan javnaðarpolitikk, átrúnaðarligan miðflokkapolitikk og sjálvstýrissinnaðan høgrapolitikk."*[1]

Tað vekir vanliga ans, tá ið ein politikari skiftir flokk. Og vanliga hoyrast illsinnisgleps um, at viðkomandi hevur tveitt politisku hugsjónirnar fyri borð, og at nú ræður bert um at halda fast um persónligu ávirkanina og valdið. Og ofta verða heiti sum „avhoppari", „flokshoppari" ella „vingliskøltur" brúkt um tinglimir, ið skifta flokk.

1 Triggir krossar, ið telja sum fjúrtan, www.sprotin.fo, 2011

**Tað kemur oftari** og oftari fyri, at føroyskir tinglimir skifta flokk. Seinastu 30 árini hava í miðal 2,6 tinglimir skift flokk hvørt valskeið. Hetta er ikki so lítið – heldur ikki, tá ið vit bera okkum saman við onnur lond.

Tað er ein avbjóðing fyri umboðandi fólkaræðið í Føroyum, um ov nógvir tinglimir skifta flokk. Tað eru jú flokkarnir, sum binda tinglimin og veljaran saman. Skiftir ein tinglimur flokk, ger hann seg inn á „sáttmálan“ millum veljaran og tinglimin. Samstundis viknar týdningurin av politiskum flokkum í Føroyum.

Flokkarnir eru ein hornasteinur í lóggevandi valdinum, t.e. á Løgtingi. Tað er ofta gjøgnum flokkarnar, at avgerðir verða tiknar, at semjur verða gjørdar og tað er í flokkunum, at einstaki tinglimurin hevur sína politisku yrkisleið. Tað eru eisini fáir politikarar, sum „eiga“ sín tingsess – teir verða í allarflestum førum valdir við atkvøðum hjá flokkinum og floksfeløgum.

Mær vitandi hevur fyribrigdið floksskifti í føroyskum politikki ikki verið granskað higartil. Henda greinin skal lesast sum eitt íkast til evnið. Endamálið er fyrst og fremst at lýsa floksskiftini á Løgtingi frá 1948 til 2019.

## Hvat er eitt floksskifti?

Tað er ymiskt, hvussu útlendskir granskarar lýsa eitt floksskifti. Tú kanst fara úr einum flokki fyri at gerast uttanflokkatinglimur. Tú kanst eisini fara úr einum flokki fyri at stovna ein nýggjan flokk ella fyri at fara í ein annan flokk.[2]

Í hesari greinini verður floksskifti skilgreinað, sum tað at politikari hevur umboðað ymiskar flokkar á Løgtingi. Sostatt er ikki nóg mikið, at tú hevur sitið fyri ein flokk á Løgtingi og síðani hevur stillað upp fyri ein annan flokk uttan at hava sitið á Løgtingi fyri flokkin.

Dømi um hetta er Bjørn á Heygum, ið sat eitt valskeið á Løgtingi fyri Sambandsflokkin og seinni stillaði upp fyri Sjálvstýri uttan at umboða flokkin á Løgtingi.

Eg havi gjørt av at leggja dent á løgtingsval síðan 1948, tá ið heimastýrislógin varð sett í gildi. Hetta merkir, at floksskifti á kommunuvalum ella fólkatingsvalum ikki eru partur av mínum grundarlagi.

## 24 tinglimir skift flokk

*„Eg kann ikki verða partur av einum flokki, har tað er ein homofobiskur hugburður hjá nøkrum fáum, sum ræður, tá tað kemur til rættindini hjá einum minniluta“*[3]

Soleiðis skrivaði Sonja J. Jógvansdóttir á heysti 2015. Hon vildi ikki longur vera partur av tingmanningini hjá Javnaðarflokkinum. Grundgevingin hjá henni var málið um borgarliga vígslu hjá samkyndum, sum ikki varð nevnt í samgonguskjalinum.

Avgerðin hjá Sonju J. Jógvansdóttur var ein politisk bumba. Bara góðar tvær vikur frammanundan hevði hon fingið eitt rimmarløgtingsval við 1.021 persónligum atkvøðum. Avgerðin skakaði eisini grundvøllin undir 17-mannasamgonguni millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn.

Stundum sera óvissa parlamentariska støðan á Løgtingi var eisini ein av høvuðsorsøkunum til, at valskeiðið millum 2015 til 2019 var baldrut. Mongu floksskiftini hetta valskeiðið høvdu við sær, at samgongan fleiri ferðir kom undir trýst, tá ið hon skuldi tryggja sær neyðugu undirtøkuna fyri sínum málum.

Aftur at Sonju J. Jógvansdóttur fór Annika Olsen úr Fólkaflokkinum og upp í Framsókn og fór síðani aftur upp í Fólkaflokkin. Seinni í valskeiðinum gjørdust Kristin Michelsen og Magni Laksáfoss uttanflokkatinglimir.

So títt var annars ikki millum floksskiftini, eftir at heimastýrislógin varð sett í gildi.

Kjartan Mohr er fyrsti tinglimurin, sum hevur umboðað ymiskar flokkar á Løgtingi. Tá ið hann varð valdur í 1954, var tað á einum uttanflokkalista, og á valinum í 1958 stillaði hann upp fyri Framburðsflokkin. Talan var kortini kanska ikki um eitt floksskifti í orðsins sanna týdningi, tí í roynd og veru var hetta sami flokkur, ið hann umboðaði.

Síðani gingu góð 30 ár til annað floksskifti á Løgtingi. Adolf V. Hansen varð í 1984 valdur fyri Kristiliga Fólkaflokkin Framburðs- og Fiskivinnuflokkin, men tá ið landsstýrið varð skipað eftir valið, klovnaði flokkurin. Adolf V. Hansen tók seg úr flokkinum, og seinni í valskeiðinum stovnaði hann Framsóknarflokkin. Tá ið Framsóknarflokkurin varð stovnaður, segði hann:

*„Eg eri gryttur úr mínum gamla flokki, men kortini ætli eg ikki at taka meg úr politiskum arbeiði, tí hetta er nakað, sum veljarar mínir til næsta val skulu taka avgerð um“*[4]

Tað hevur verið ein avbjóðing at gera eitt yvirlit yvir floksskifti á Løgtingi, tí tað fyriliggur ikki nøkur skráseting nakrastaðni. Sostatt ber til, at okkurt skiftið er gloppið burtur ímillum.

Sambært yvirliti 1 hava í alt 24 tinglimir umboðað ymiskar flokkar á Løgtingi síðani 1948.

2 Partiskift i Folketinget 1953-2015, Kaldahl Nielsen og Helboe Pedersen, Institut for Stats kundskab, Aarhus Universitet.

3 Sonja J. Jógvansdóttir, Facebook 16. september 2015

4 Eysturoyggin nr. 2. 11. november 1986











Myndir: Jens Kr. Vang


**Yvirlit 1.**

| Løgtingslimur | Vald á lista/flokki | Úr | Nýggjur flokkur | Uppí |
|---|---|---|---|---|
| Kjartan Mohr | Uttanflokkalistin | 1955 | Framburðsflokkurin | 1955 |
| Adolf V. Hansen | Kristiligi Fólka- Framburðs og Fiskivinnuflokkurin | 1985 | Framsóknarflokkurin | 1986 |
| Tordur Niclasen | Kristiligi Fólka- Framburðs og Fiskivinnuflokkurin | 1991 | Miðflokkurin | 1991 |
| Lasse Klein | Sjálvstýrisflokkurin | 1994 | Kristiligi Fólka- Framburðs og Fiskivinnuflokkurin | 1994 |
| Óli Jacobsen | Javnaðarflokkurin | 1994 | Verkamannafylkingin | 1994 |
| Finnbogi Arge | Sambandsflokkurin | 1995 | Fólkaflokkurin | 1998 |
| Kristian Magnussen | Verkamannafylkingin | 1998 | Javnaðarflokkurin | 1998 |
| Karl Robert Johansen | Verkamannafylkingin | 1998 | Javnaðarflokkurin | 1998 |
| Helena Dam á Neystabø | Sjálvstýrisflokkurin | 2001 | Javnaðarflokkurin | 2002 |
| Heðin Mortensen | Sambandsflokkurin | 2004 | Javnaðarflokkurin | 2004 |
| Johan Dahl | Sambandsflokkurin | 2006 | Uttanflokkatinglimur | 2006 |
| Karsten Hansen | Tjóðveldisflokkurin | 2006 | Miðflokkurin | 2007 |
| Kári Petersen | Javnaðarflokkurin | 2008 | Sjálvstýrisflokkurin | 2008 |
| Poul Michelsen | Fólkaflokkurin | 2010 | Framsókn | 2011 |
| Sjúrður Skaale | Tjóðveldi | 2010 | Javnaðarflokkurin | 2010 |
| Sámal Petur í Grund | Sjálvstýrisflokkurin | 2011 | Framsókn | 2011 |
| Gerhard Lognberg | Javnaðarflokkurin | 2013 | Sambandsflokkurin | 2014 |
| Janus Rein | Framsókn | 2012 | Fólkaflokkurin | 2013 |
| Kristianna Winther Poulsen | Nýggja Sjálvstýri | 2015 | Javnaðarflokkurin | 2015 |
| Pauli Trond Petersen | Fólkaflokkurin | 2013 | Tjóðveldi | 2015 |
| Annika Olsen | Fólkaflokkurin | 2015 | Framsókn | 2015 |
| Sonja Jógvansdóttir | Javnaðarflokkurin | 2015 | Uttanflokkatinglimur | 2015 |
| Magni Laksáfoss | Sambandsflokkurin | 2018 | Uttanflokkatinglimur | 2018 |
| Kristin Michelsen | Javnaðarflokkurin | 2019 | Sjálvstýri | 2019 |

Flestallir tinglimir í yvirliti 1 hava bara eina ferð skift flokk. Annika Olsen og Johan Dahl hava kortini tað í felag, at tey í einum valskeiði fóru úr sínum flokki fyri seinni at melda seg inn aftur í sama flokk. Munurin var, at Annika Olsen fyrst fór upp í ein annan flokk, og Johan Dahl var uttanflokkatinglimur eitt stutt skifti.

## Ein nýggj tíð

Flestir løgtingslimir hildu seg fram til nítiárini til at umboða ein og sama flokk. Men frá 1990 og frameftir dagaði ein nýggjur politiskur veruleiki undan. Fimm tinglimir tilsamans valdu frá 1990 til 1998 at venda tí flokki, ið teir vóru valdir fyri, bakið. Í valskeiðinum frá 1990 til 1994 skiftu bæði Tordur Niclasen og Lasse Klein flokk, og í valskeiðinum eftir, frá 1994 til 1998, gjørdu Finnbogi Arge, Kristian Magnussen og Karl Robert Johansen tað teimum eftir.

„*Eg hevði ongar betonkiligheitir við at stilla upp fyri Javnaðarflokkin, sum eg havi havt eitt gott samstarv við, og sum er tann flokkur, sum liggur mínari hugsjón nærmast*“[5] varð Kristian Magnussen endurgivin at siga, eftir hann fór úr Verkamannafylkingini.

Seinastu 30 árini gongur næstan ikki valskeið, uttan at onkur tinglimur skiftir flokk. Sí talvu 1.

## Talva 1




Í flestum førum er lætt at gera floksskiftini upp í sambandi við tey ymisku valskeiðini, men í ávísum førum er tað torførari. Eitt nú fór Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum og upp í Javnaðarflokkin eftir kommunuvalið í 2004, men hann umboðar ikki Javnaðarflokkin á Løgtingi fyrr enn í 2015. Í slíkum førum havi eg bólkað floksskiftið tað tíðarskeiðið, ið viðkomandi tekur avgerðina um at skifta flokk.

Millum 1948 og 2019 vóru í alt 19 valskeið. Hesi 19 valskeiðini skiftu 24 tinglimir flokk. Í miðal hava 1,3 tinglimir skift flokk hetta tíðarskeiðið. Sammett við onnur lond er hetta ikki so nógv, at tað er merkisvert. Í Danmark eru eitt nú skrásett 74 floksskifti í tíðarskeiðinum 1953-2019. Tað er í miðal 3,2 fólkatingslimir fyri hvørt valskeið. Her er vert at hava í huga, at tað eru í alt 179 fólkatingslimir, so í prosentum er talið hægri á Løgtingi enn í Fólkatinginum.

Men hyggja vit bara at tíðarskeiðinum frá 1990 á Løgtingi, hava í alt 21 tinglimir skift flokk í tilsamans átta valskeiðum. Hetta svarar til, at síðani 1990 hava 2,6 tinglimir í miðal skift flokk í hvørjum valskeiði.

## Størri sjálvdráttur

Ein grundleggjandi broyting, sum kann hava skundað undir fleiri floksskifti, er broytta valskipanin. 15 av teimum í alt 24 tinglimunum, ið hava skift flokk, hava gjørt tað eftir 2008, tá ið farið var frá sjey valdømum niður í eitt valdømi. Við einum valdømi kappast politikararnir ikki longur bara um atkvøðurnar í sínum egna valdømi. Nú kappast øll ímóti øllum, og tá er skjótt, at felagsskapskenslan viknar samsvarandi.

Tú kanst grundgeva fyri, at søguliga verða lunnar lagdir undir hesa gongdina við broytingini til løgtingsvalið í 1966. Tá verður farið frá raðfestari uppstilling til, at tað nú var tann, sum fekk flestar persónligar atkvøður, ið varð fyrst valdur, um listin fekk umboðan. Við hesi broyting kanst tú siga, at vit fara frá eini skipan, har persónurin hevur meira brúk fyri flokkinum, til eina skipan, har flokkurin hevur meira brúk fyri persóninum.

Valhagtølini síðani 2008 vísa, at færri veljarar seta krossin við ein flokslista. Samlaða talið av listaatkvøðum á løgtingsvalinum í 2019 var 1.637, ella 4,8 prosent. Bera vit saman við løgtingsvalið í 2004, tá ið vit seinastu ferð høvdu sjey valdømi, var talið á listaatkvøðum 3.880, ella 12,0 prosent, t.e. 7,2 prosentstig fleiri enn í 2019. Hetta er ein ábending um, at veljarin í størri mun hyggur at persónunum enn flokkunum.

„*Politikarar ganga í sjálvdrátti og føla als ikki sama trúfesti móti flokkum, sum teir gjørdu fyrr. Nú á døgum himprast politikarar ikki við at skifta flokk. Tað tykist fella teimum líka lætt, sum tað er hjá einum fótbóltsspælara at skifta felag. Tá ið valevnini førdu valstríð fyrr, heittu tey altíð á veljaran um at velja tann ávísa flokkin, hvørt einstakt valevni stillaði upp fyri. Nú rópa øll valevnini í kór: Vel meg!*“[6], segði Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, í 2011.

Tíverri er vitanin sera avmarkað um, hvussu veljararnir flyta seg millum flokkarnar í Føroyum, men uttanlands vísa kanningar, at flytingarnar eru stórar og vaksandi. Talið á kjarnuveljarum, t.e.

5 Sosialinum 7. mars 1998

6 Sosialurin 5. oktober 2011

teimum, sum eru trúføst ímóti einum og sama flokki, minkar, og talið á marginalveljarum, t.e. teimum, sum skifta millum flokkarnar, veksur.

Serliga millum tey ungu sæst ein afturvendandi mynd. Heldur enn at hyggja at, hvat ein flokkur yvirskipað stendur fyri, verða eyguni heldur vend ímóti, hvat ein flokkur ella eitt valevni heldur um eitt ávíst mál – tað kann verða skattur, umhvørvi ella etisk mál. Hetta verður rópt fyri „issue voting".[7] Henda veljaraatferð hongur neyvt saman við vaksandi individualiseringini, har tann einstaki í størri og størri mun tekur sjálvstøðugar avgerðir, sum ikki longur nýtast at vera bundnar at hansara sosialu støðu, kyn, familju ella siðvenju[8].

Tá ið veljarar reika meira millum flokkar enn áður, kann tað hugsast, at tað gerst lættari hjá einstaka tingliminum at skifta flokk, tí møguleikin fyri, at veljararin flytur við í nýggja flokkin, er størri nú enn áður.

Men sum sagt, so er vitanin í Føroyum um veljaraatferð sera avmarkað, og tí skal hetta uppáhald takast við fyrivarni.




## Veljarin lumpaður?

Nógvir veljarar kunnu kortini kenna seg snýttar, tá ið teirra tinglimur skiftir flokk. Tað kunnu sjálvandi vera ymiskar orsakir til, at ein veljari júst velur at seta krossin við ein ávísan politikara. Nógvir føroyingar velja óivað ikki bara ein tinglim at umboða seg á Løgtingi, men eisini eitt umboð fyri ein ávísan flokk. Tað er tí eitt álitisbrot, tá ið tinglimurin brúkar tingsessin at umboða ein annan flokk.

Men tað er sjáldan, at almenningurin fær fult innlit í, hví flokkur og tinglimur fara hvør til sítt. Eitt er myndin úteftir. Eitt annað er, hvussu innanhýsisviðurskiftini millum tinglim og flokk hava verið.

Kanska er veruleikin eitt sindur fløktari, enn at politikarar bara skifta flokk fyri persónliga at varðveita ávirkan og vald? Fleiri skifti koma óivað eftir eina drúgva tilgongd, har flokkurin og tinglimurin flyta seg longri og longri burtur hvør frá øðrum. Ella hevur tinglimurin kanska rakt við, at hann ikki kann samstarva við ávísar persónar. Tá ið hetta er støðan, so kann eitt floksskifti tykjast skilagott fyri báðar partar.

*„Vørðu vit verandi saman, fór tað bert at føra til klandur og meiningsleyst stríð. Tí var tað best, at flokkurin og eg skiltust"*,[9] varð Tordur Niclasen endurgivin fyri at siga, eftir at Kristiligi Fólkaflokkurin og hann fóru hvør til sítt.

Tað krevur eisini áræði at skifta flokk. Tú sigur farvæl við ein felagsskap, ið tú hevur verið partur av í fleiri ár, ein samleika og kanska eisini tøtt vinaløg.

Tú kanst eisini grundgeva fyri, at møguleikin hjá einum tinglimi at skifta flokk eisini er eitt stýringaramboð hjá tingliminum mótvegis floksleiðsluni, um flokkurin ikki heldur lyftini, ið hann hevur givið veljaranum. Tí kann eitt floksskifti eisini brúkast sum ein revsimøguleiki hjá einstaka tingliminum. Sostatt kunnu floksskifti eisini virka sum eitt tekin um eitt sunt demokrati, heldur enn eitt sjúkt demokrati, sum tað ofta verður lagt út til at vera.

Tað er ikki bara veljarin, sum kann kenna seg snýttan, tá ið ein løgtingslimur skiftir flokk. Eisini flokkurin hjá viðkomandi kann kenna seg lumpaðan. Tað er hent meira enn eina ferð, at flokkar hava kravt, at tá ið politikarar venda flokkinum bakið, at teir lata tingsessin til flokkin aftur, tí flokkurin „eigur" atkvøðurnar. Í 1995 heitti Niels Nattestad, formaður í Føroya Væl, á Finnboga Arge um leggja tingsessin frá sær, eftir at hann var farin úr Sambandsflokkinum:

*„Vit halda okkum hava rætt til atkvøðurnar, av tí at Finnbogi Arge hevur svikið flokkin. Tí heita vit á hann um at víkja sætið, so vit kunnu fáa eitt trygt stýri í landinum, men eisini av tí, at flokkurin av hesi ósemju nú stendur veikari enn áður"*[10]

Men tinglimir halda hvørja ferð fast um tingsessin. Sama um teirra persónliga atkvøðutal hongur saman við, hvønn flokk viðkomandi hevur stillað upp fyri. Og tað hevur tingmaðurin sín fulla rætt til. Tí sambært grein 23 í Stýrisskipan Føroya eru løgtingslimir „...bert bundnir av sannføring síni, og ikki av forskriftum frá veljarum sínum."

Tingsessurin hoyrir – formliga – til tinglimin persónliga. Hann er ikki til láns frá nøkrum – hvørki frá flokki ella veljara. Veljarin kann kortini lata vera við at atkvøða fyri viðkomandi tinglimi, næstu ferð tað er val, um hann ikki er nøgdur við avrikið ella avgerðirnar hjá tingliminum.

## Javnaðarflokkurin gongur undan

Javnaðarflokkurin er tann flokkur, sum hevur tikið ímóti flest løgtingslimum, sum hava umboðað annan flokk. Flokkurin hevur í alt fingið seks tinglimir úr øðrum flokkum.

Hetta havi ikki øll verið so fegin um. Í 2008 skrivaði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, soleiðis:

*„Vit eru helst nógv sum eisini undrast yvir, at Javnaðarflokkurin nú tykist verða so rúmligur, at øll sum kunnu savna nakrar atkvøður kunnu sleppa á vallistan (...). Vit síggja at fyrrverandi framstandandi sambandsfólk og sjálvstýrisfólk standa sum valevni hjá Javnaðarflokkinum, og eingin í flokkinum tykist at seta spurnartekin við um hesi valevni kunnu umboða veruligu javnaðarhugsjónirnar. Javnaðarflokkurin kann missa meira enn flokkurin vinnur við at loyva einum og hvørjum at stilla upp sum valevni fyri flokkin."*[11]

Gransking uttanlands vísir, at tað eru serliga tvey viðurskifti, sum ganga aftur, tá ið flokkar taka ímóti tinglimum úr øðrum flokkum. Í fyrra lagi verður mett, um nýggi tinglimurin kann styrkja um parlamentarisku støðuna hjá flokkinum. Í øðrum lagi hevur tað týdning, um nýggi tinglimurin eisini kann draga nýggjar veljarar til flokkin.[12]

Skrásetingin úti í heimi vísir, at tað eru lutvíst fáir tinglimir, sum taka avgerð um at fara úr teimum

7 Issue voting, Borre, 2001

8 Politiske identiteter i senmoderniteten, A-D. Christensen, 2004

9 Sosialurin 12. mars 1998

10 Sosialurin 18. november 1995

11 Sosialurin 11. januar 2008

12 Political Parties and Legislative Party Switching, Mershon & Heller, 2009

størru flokkunum. Hesa mynd síggja vit ikki í Føroyum. Bólka vit Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldi sum teir stóru flokkarnar, so vísir yvirlit 1, at meira enn helmingurin av øllum tinglimunum eru farnir júst úr hesum fýra flokkunum.

Gransking uttanlands[13] vísir eisini, at vanliga myndin er, at tað eru teir stóru flokkarnir, sum fáa tinglimir úr teimum smærru flokkunum. Henda mynd er heldur ikki so sjónlig í Føroyum. Flestu skiftini eru annaðhvørt úr einum stórum flokki í ein annan stóra flokk, ella úr einum lítlum flokki í ein annan lítlan flokk. Kortini eru nøkur dømi um at skifta ein lítlan flokk út við ein stóran: Helena Dam á Neystabø, sum fór úr Sjálvstýrisflokkinum og upp í Javnaðarflokkin og Janus Rein, sum fór úr Framsókn og upp í Fólkaflokkin.

Í Føroyum eru eisini dømi um tað øvuta. Poul Michelsen og Karsten Hansen fóru báðir úr stórum flokkum, og síðani fóru teir at umboða ein av smærru flokkunum.

Uttanlands eru eisini fleiri dømi um, at fleiri tinglimir taka seg úr einum flokki samstundis fyri annaðhvørt at stovna nýggjan flokk ella at fara í annan flokk. Í nítiárunum rýmdu m.a. fleiri fólkatingslimir úr Fremskridtspartiet og stovnaðu Dansk Folkeparti.

Hetta hava vit heldur ikki sæð so týðiliga í føroyskum politikki. Kanska kemst hetta av, at flokkarnir eru smáir.

Í 1994 kom nýggi flokkurin Verkamannafylkingin á ting við trimum tinglimum. Verkamannafylkingin var m.a. stovnað sum eitt mótmæli ímóti Javnaðarflokkinum, og fleiri limir í flokkinum høvdu fyrr verið virknir í Javnaðarflokkinum. Ein teirra var Óli Jacobsen, sum seinast í sjeytiárinum sat á tingi sum varamaður fyri Javnaðarflokkin. Alt valskeiðið var baldrut innanfloks, og tá ið avtornaði, fóru Kristian Magnussen og Karl Robert Johansen, sum báðir sótu á Løgtingi fyri Verkamannafylkingina, upp í Javnaðarflokkin.

Søguliga hava fleiri floksskifti í Føroyum elvt til, at nýggir flokkar eru stovnaðir. Dømi um hetta eru Poul Michelsen og Framsókn, Kjartan Mohr og Framburðsflokkurin, Adolf Hansen og Framsóknarflokkurin og Tordur Niclasen og Miðflokkurin.

## Hví skifta tey?

*„Sum ungur fór eg upp í Fólkaflokkin og fylgdi honum í áravís, men tá ið flokkurin fullkomiliga stagneraði, kundi eg ikki vera við longur. Verðin flytur seg, men Fólkaflokkurin stendur í stað.“*[14]

Á heysti 2010 tók Poul Michelsen, tinglimur hjá Fólkaflokkinum, eina grundleggjandi avgerð. Eftir sløk 40 ár í Fólkaflokkinum tók hann seg úr flokkinum.

Nakrar fáar mánaðir seinni tók Sjúrður Skaale, tinglimur fyri Tjóðveldi, somu avgerð. Hann og flokkurin drógu ikki eina línu í málinum um Stjórnarskipan Føroya.

*„Eg liggi í opnum stríði við leiðsluna. Tað er ikki virðiligt fyri nakran av pørtunum, og tí havi eg tikið avleiðingarnar og eri farin úr flokkinum“*[15] grundgav fyrrverandi tjóðveldistinglimurin.

Hvørt floksskifti hevur sína egnu søgu.

At kalla øll skifti hava sín uppruna í onkrum stríði. Annaðhvørt einum hugsjónarligum – ella einum persónligum stríði. Tað er sjáldan, at flokkur og tinglimur fara hvør til sítt í sátt og semju.

Men hví skifta politikarar flokk?

Ein afturvendandi grundgeving er, at flestir politikarar fyrst og fremst eru „rationellir aktørar“. Tað merkir, at aðalmálið hjá politikaranum er altíð at verða afturvaldur, og bøtist møguleikin fyri tí við at skifta flokk, ger politikarin tað[16].

Eg havi hugt nærri at, hvat er komið fram í miðlunum, tá ið tinglimir hava skift flokk. Ein avbjóðing er, at í fleiri førum er ymiskt, hvussu flokkur og tinglimur leggja tekstin út, og tí er talan um nakrar yvirskipaðar flokkingar.

### *Politiskir tungvektarar*

Í hesum bólki teljast tinglimir, sum ikki halda, at teir koma til sín rætt í flokkinum, og tí annaðhvørt stovna nýggjan flokk ella fáa ein stóran leiklut í einum øðrum flokki. Dømi um hetta kunnu vera Poul Michelsen, Heðin Mortensen, Karsten Hansen og Helena Dam á Neystabø.

### *Flokkurin fær nóg mikið*

Í hesum bólki tekur flokkurin sjálvur avleiðingarnar av einari ósemju, sum hevur vart í fleiri ár, og politikarin fær durafjórðingin. Dømi um hetta er Javnaðarflokkurin, sum koyrdi Gerhard Lognberg og Kristin Michelsen úr flokkinum.

### *Støðugt stríð við flokkin*

Í hesum bólki eru politikarar, sum hava verið í almennum stríði við flokkin um ymisk mál í longri tíð. Dømi um hetta kunnu vera Sjúrður Skaale, Magni Laksáfoss og Kristianna Winther Poulsen.

### *Etisk mál*

Í hesum bólki eru politikarar, sum vegna sína per-

13 Ibid
14 Sosialurin 30. oktober 2010
15 Sosialurin 27. mai 2011
16 Political Parties and Legislative Party Switching, Mershon & Heller, 2009















sónligu sannføring í etiskum málum gera av at siga flokkinum farvæl. Dømi um hetta eru Karsten Hansen og Sonja J. Jógvansdóttir.

### Verða tey vald ella ikki?

Á løgtingsvalum er ofta ein ávísur spenningur, um veljarin revsar tinglimin fyri at hava skift flokk. Hyggja vit nærri at teimum 24 floksskiftunum, so er ymiskt, hvussu væl tað gongur hjá politikarum, sum velja at stilla upp fyri nýggju flokkarnar. Í yvirliti 2 havi eg sett sum treyt, at viðkomandi politikari verður valdur beinleiðis á Løgting og ikki verður eykavaldur, eftir at landsstýrið verður skipað.

Karsten Hansen, Poul Michelsen og Kristin Michelsen eru dømi um politikarar, sum verða valdir á fyrsta valinum, ið teir stilla upp, eftir at hava skift flokk.

Tað hendir ikki ofta, at politikarar gera av at fara úr einum flokki og síðani ikki at stilla upp á løgtingsvalinum eftir. Hetta hendi á seinasta valskeiði, tá ið Magni Laksáfoss og Sonja J. Jógvansdóttir ikki stilladu upp fyri ein annan flokk á løgtingsvalinum 2019.

**Yvirlit 2**

| Løgtingslimur | Nýggjur flokkur | Valdur fyrsta løgtingsvalið eftir |
|---|---|---|
| Kjartan Mohr | Framburðsflokkurin | Ja |
| Adolf Hansen | Framsóknarflokkurin | Nei |
| Tordur Niclasen | Miðflokkurin | Ja |
| Óli Jacobsen | Verkamannafylkingin | Ja |
| Lasse Klein | Kristiligi Fólka- Framburðs og Fiskivinnuflokkurin | Ja |
| Finnbogi Arge | Fólkaflokkurin | Nei |
| Kristian Magnussen | Javnaðarflokkurin | Ja |
| Karl Robert Johansen | Javnaðarflokkurin | Nei |
| Helena Dam á Neystabø | Javnaðarflokkurin | Nei |
| Heðin Mortensen | Javnaðarflokkurin | Nei |
| Johan Dahl* | Uttanflokkatinglimur | |
| Kári Petersen | Sjálvstýrisflokkurin | Nei |
| Poul Michelsen | Framsókn | Ja |
| Sjúrður Skaale** | Javnaðarflokkurin | |
| Sámal Petur í Grund | Framsókn | Nei |
| Gerhard Lognberg | Sambandsflokkurin | Nei |
| Janus Rein | Fólkaflokkurin | Nei |
| Kristianna Winther Poulsen | Javnaðarflokkurin | Nei |
| Pauli Trond Petersen | Tjóðveldi | Nei |
| Annika Olsen*** | Framsókn | |
| Sonja Jógvansdóttir | Uttanflokkatinglimur | Stillaði ikki upp |
| Magni Laksáfoss | Uttanflokkatinglimur | Stillaði ikki upp |
| Kristin Michelsen | Sjálvstýri | Ja |

* Fór aftur í Sambandsflokkin
** Stillaði ikki upp til løgtingsvalið í 2011. Stillaði upp til løgtingsvalið í 2015, men varð ikki valdur. Tók kortini sæti fyri flokkin eina ferð í valskeiðinum.
*** Fór aftur í Fólkaflokkin

Yvirlit 2 vísir, hvør varð afturvaldur fyrsta løgtingsval, eftir at viðkomandi hevði skift flokk. Sum yvirlitið vísir, so er møguleikin fyri at verða afturvaldur á Løgting ikki so góður, um ein tinglimur velur at skifta flokk. Átta tinglimir kláraðu at verða valdir á fyrsta løgtingsvalinum eftir floksskiftið. 11 tinglimir kláraðu tað ikki, men nøkur teirra vunnu sæti á Løgtingi, eftir at Landsstýrið varð skipað. Hini fimm stilladu annaðhvørt ikki uppaftur ella stilladu uppaftur fyri sama flokk, ið tey í sínari tíð tóku seg úr.

### Heldur gongdin fram?

Fleiri og fleiri tinglimir velja at skifta flokk. Síðani 1990 hava í miðal 2,6 tinglimir skift flokk hvørt valskeið. Tað svarar til, at sløk átta prosent av øllum tinglimum skifta flokk hvørt valskeið.

Heldur henda gongd fram, viknar álitið hjá veljarunum á tinglimin og á flokkarnar. Ov nógv floksskifti kunnu eisini birta undir eitt óstøðugt løgtingsarbeiði, sum vit upplivdu farna valskeið. Við øðrum orðum kunnu ov nógv floksskifti fáa álitið á politisku skipanina og harvið á fólkaræðið at ridla.

Hvørji eru so ráðini at taka? Helst liggur ein lykil hjá teimum einstøku flokkunum. Tað er neyðugt at styrkja flokkarnar bæði fyrisitingarliga og fíggjarliga. Við hesum skulu vit veljarar seta flokkunum krøv. Tað eru alt ov nógv dømi um, at tilvildin ræður, tá ið flokkarnir í skundi leita eftir valevnum stutt undan einum vali. Tað er í alt ov lítlan mun ein skipað tilgongd, tá ið nýggj valevni skulu útvegast flokkinum. Hjá smáu flokkunum er altíð ein vandi, at tað eru einstaklingar, sum mynda flokkin, og tá er skjótt, at stevnan hjá flokkinum verður treytað av hugsjónini hjá einstaka politikaranum heldur enn stevnuni hjá flokkinum. Eitt tað besta dømi um hetta í nýggjari tíð er Sjálvstýri.

Tað er ikki ein gongd leið at løggeva ímóti floksskiftum, sum eitt nú Japan og Ekvador hava gjørt. Møguleikin hjá einum tinglimi at skifta flokk, um flokkurin gongur beint ímóti tí, ið hann hevur lovað veljarunum, má altíð vera til staðar.

Tað snýr seg um at hava røttu javnvágina. Undir ávísum fortreytum kann eitt floksskifti vera tekin um eitt vælvirkandi fólkaræði, men onnur og ov nógv floksskifti kunnu hótta sama fólkaræði.

### Keldur:


Christensen, Clement. 2016. *Partidisciplin og partibrud En gennemgang af repræsentative konsekvenser ved folketingsmedlemmer afgang fra partier i perioden 1945-2016*. Roskilde Universitet
Christensen, Ann-Dorte. 2004. Politiske identiteter i senmoderniteten. *Dansk Sociologi* nr. 1/15. årg. 2004
Desposati, Scott W. 2006. Parties for rent? Ambition, ideology, and party switching in Brazil's chamber of deputies, Party Politics And Legislative Party Switching. *American Journal of Political Science*.
*Dimmalætting*, Vit vilja hava tingsessin aftur, 18. november 1995
*Eysturoyggin*, Adolf V. Hansen og Framsóknarflokkurin, 11. november 1986
*Historier om partihoppere i Danmark:* www.partihop.dk
Klein, Elad. 2016. *The personal vote and legislative party switching.*
*Kristeligt Dagblad.* Partihop er med til at sikre demokratiet. 17. januar 2020
Mershon, Carol & Heller, William B. 2009. *Political Parties and Legislative Party Switching.*
O'Brien, Diana & Shomer, Yeal. 2013. A Cross-National Analysis of Party Switching, *Legislative Studies Quarterly*, Tel Aviv University.
Pedersen, Helene Helboe & Nielsen, Marie Kaldahl. *Partiskift i Folketinget 1953-2015*, Aarhus Universitet
Sonja J. Jógvansdóttir, Facebook 16. september 2015
*Sosialurin*, Við hvørt er neyðugt at skifta flokk, 12. mars 1998
*Sosialurin*, Flokshopparar ella floksagi, 30. september 2011
Tríggir krossar, ið telja sum fjúrtan, www.sprotin.fo 2011

# UPPÁVEGIN

## – kanska tað kemur frá *uppÁvegin* = 'tung'

Tað hevur mangan verið spurt, hvaðani orðingin *uppávegin* stavar í føroyskum, og sagt hevur verið, at tað er hetta at vera 'ávegis' at eiga barn. Tað skal tá koma úr donskum, har tey hava dømi eins og hesi í *Ordbog over det danske sprog*.



**Hjalmar P. Petersen**
hjalmar@setur.fo
professari í málvísindum
Føroyamálsdeildin

**Tað er ein møguleiki**, at *pá vegin* kemur úr donskum *paa Vej*, men hví verður tað ikki til *á veg* ella *ávegis* t.d.? Og hví verður *paa Vej(e)* bundið í føroyskum, t.e. ikki *pá veg,* men *pá vegin*?

Lýsingarorðið *gravid* er sett saman av *grav+id* og er tøkuorð úr latíni *gravidus*, ið er leitt av *gravis*, sum merkir 'tungur'. Í íslendskum nýta tey *þungað* og *ólétt*, og sæst tað fyrra í hvussu so er aftur í tí latínska *gravis* = 'tungur'. Hetta er eisini í gæliskum *trom* = 'tungur', og er hetta í fleiri málum kring um í heiminum.

Norrøna sagnorðið *viga* varð sterkt bent: *vega – vá – vágum – veginn*; tað kann merkja (1) 'heve, lyfte; vege opp (med lyftestong o.l.)' … og í eini merking frámerkt (5) 'vege, finne kor tungt noko er' (Heggstad, Hødnebø og Simensen 1975: 488), og tað er møguligt, at '-vegin', sum er kvennkynsformur, gongur aftur til annan lýsingarhátt í norrønum *veginn*, kvennkyn *vegin*, t.e. 'vigaður' ella møg. 'tungur'.

Í føroyskum ber til at hava samansetingar við rytmiskari herðing sum *niðurAVfarin, niðurUNdirkomin, afturFYrisegkomin* o.s.fr. Stavilsið við tyngstu herðing er skrivað her við kleppstavum.

At hetta er rytmisk herðing merkir, at tyngsta herðing er á triðja stavilsi. Hesar samansetingar hava tískil ikki tað herðingarmynstur, sum vanligt er í samansettum orðum, t.e. við høvuðsherðing á fyrsta liði og hjáherðing á síðsta liði: *EFTirlønarGrunnur*, við høvuðsherðing á -EFT- og hjáherðing á -Grun-. Fyri at sleppa undan ljóðskrift vísi eg herðing sum í nevnda dømi.

### Hon er uppÁvigað

Uppskot mítt er nú, at í eldri føroyskum hava vit havt *hon er uppÁvegin* við merkingini 'tung', t.e., at 'vigað er upp á hana', sbr. at 'tungur' er tann merking, sum er vanlig í málum kring um í heiminum. Ein greining av *uppávegin* er sostatt, at tað stavar frá samansetingini *uppÁvegin*, sum so verður til *uppávegin*.

Fyri at fáa hetta fram rættiliga, skalt tú lesa *uppÁvegin* við herðing á Á, sum tað kann hava verið á eldri málstigi.



**Tilvísingar:**
**Heggstad, Leiv**, Hødnebø, Finn & Simensen, Erik. 1975. *Norrøn ordbok. 3. utgåva av Gamalnorsk ordbok*. Det norske Samlaget. Oslo.

# EIN SØGA UM *ONK, EYMKAN* OG *ÁNK*



**Jógvan í Lon Jacobsen**
jogvanlj@setur.fo
professari í málfrøði
dr.philos.
Føroyamálsdeildin

Onkur heldur kanska, at yvirskriftin er ein tvætlisetningur. Men so er ikki, tí henda greinin snýr seg um kallkynsorðið *onkur*, sum í hvønnfalli hevur formin *onk*. Tað er ella var eitt navnorð til í føroyskum við hesum sniði í merkingini 'eymkan, stynjan'. Her er altso málsligur skyldskapur millum orðini *onkur* og *eymkan*. Eisini verður nomið við orðið *ank*, sum er ein misskiltur síðuformur til *eymk*. *Onkur*, *eymkan* og *ank* hava sama málsøguliga uppruna. Tað er tað, sum hesin stubbin snýr seg um.

Hóast fornavnið *onkur* og navnorðið *onkur* hava sama form í føroyskum, hava tey hvør sín málsøguliga uppruna. Fornavnið *onkur* er runnið av tí norrøna forminum *einnhverr* (før. *einhvør*), og navnorðið *onkur* er runnið av einum norrønum orði **aumkr*[1], sum hevði svarað til ein føroyskan form **eymkur*, um aðrar broytingar ikki vóru hendar við orðinum. Orsøkin til tað formliga samanfallið er tilvildarlig, tí ymiskar ljóðbroytingar eru farnar fram í føroyskum, sum gera, at orðini hava fingið sama form og framburð og tí eru homografar og homonym.



1 Stjørnan merkir, at formurin ikki er til í norrønum og er tí endurgjørdur við støði í tí føroyska forminum.

### Gleðin um eitt orð

Viðhvørt hendir okkurt óvæntað. Og tað var júst tað, sum hendi ein vakran várdag í apríl 2021. Tað óvæntaða og eisini stuttliga var, at ein starvsfelagi bar mær *onk* inn á borðið, eitt orð, sum eg ikki kendi. Tað var ikki so løgið, at eg ikki kendi orðið, tí tað hoyrir til í útjaðaranum, ikki bara reint landafrøðiliga (tað ger tað eisini), men eisini tí at tað ikki er partur av føroyskum gerandismáli. Tað hevur ligið væl fjalt onkustaðni ytst úti undir væðingini.

Tað er kanska í so avgjørt at siga, at hetta orðið varð bjargað henda dagin í apríl, tí tað var uppskrivað frammanundan, eitt og sama dømi á tveimum seðlum í orðasavninum, umframt Svabo við ongum nýtsludømi (https://sedlasavn.setur.fo/WordCards/PublicIndex). Men við hesum døminum, sum nú kom undan kavi, tvífaldaðist talið av nýtsludømum av hesum orði – úr einum upp í tvey! Og tað kann gera stóran mun. Tað var júst tað, sum hendi, tí at samteksturin í tí nýggja døminum vísir, at nýtslan av hesum orði rúmkaðist.

Í tí døminum, sum greinin í Føroyskari orðabók (Poulsen o.fl., 1998) byggir á, verður *onkur* lýst sum partur av einum meira ella minni føstum orðasambandi (orðabókin sigur *í osb. sum*, sum merkir 'í orðasambandi sum t.d.'). Tann syntaktiski valensurin er víðkaður við tí nýggja døminum, tí at orðið nú vísir onnur syntagmatisk eyðkenni og hevur tí aðrar syntaktiskar nýtslumøguleikar, enn tað gamla dømið vísir, og gevur okkum tí eina fjølbroyttari og sannari mynd av nýtsluni av hesum orði, enn orðabókin upprunaliga gav. Tí er orðabókargreinin broytt samsvarandi teimum nýggju upplýsingunum.

Henda søgan um *onk* er dømi um áhugan hjá føroyingum fyri orðum og er orsøkin til hesa grein. Tað er sjálvandi at fegnast um, at føroyingar hava áhuga fyri orðum, tí var tað ikki so, var føroyskt verri skjalfest, og orðabøkurnar tilsvarandi minni áhugaverdar og eftirfarandi. Orð eru neyðug, fyri at vit skulu kunna samskifta. Men orð eru ikki bara ein funktionell støða. Tey hava eisini eitt innari virði, eitt virði í sjálvum sær og eru tí áhugaverd hjá málfrøðingum at granska.

### Heimasíðan bygdin.fo

Teksturin, sum hetta orðið er ein partur av, er at finna á heimasíðuni bygdin.fo, sum er um bygdina við Gjógv. Á heimasíðuni er ein grein um Jóhonnu Debes (fødd Klein, 1896-1984). Hon var gift við Sofusi Debes (1896-1975), og tey áttu trý børn. Sonurin, Óli (1944-2020) verður nevndur í brotinum niðanfyri.

Her fari eg fyrst at endurgeva eitt brot úr tekstinum um Jóhonnu Debes á heimasíðuni bygdin.fo[2]:

> *Jóhanna var ein sjáldsama blíð og fyrikomandi kona. Gestablídni setti hon í hásætið, og tað var ikki smávegis tal, ið har er komið á gátt og hevur notið alt gott frá hesi hjartagóðu konu. Óli og eg vóru javnaldrar og hildu nógv saman, og so var hon har við síni eymu rødd og altíð við tí góða orðinum. Eg havi nógv góð minnir um Jóhonnu, og eg haldi, at eg fari at nevna eitt orð, ið hon lærdi meg sum smádrongur, og sum eg ongantíð havi gloymt. Eina tíð meðan vit gingu í barnaskúla, lá Óli á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Tað feilti okkurt við nýrunum. Ein dagin eg komi fram við køksvindeyganum hjá Jóhonnu, letur hon vindeygað upp og sigur: „Áh, Jesus, góði! Tað er sovorðin onkur at síggja teg." Hon hevur helst sæð á mær, at at eg ikki skilti, hvat hon meinti við, tí so sigur hon: „Jú, góði! Tá ið eg síggi teg, so fært tú meg at hugsa um Óla, og eg fari at leingjast so illa eftir honum, tað er onkur." Veit meg ikki hava hoyrt hasa merkingina aftur.*

Tað var Jóhanna, ið brúkti orðið *onkur*, og Ásfinn Sigvardsen, bygdarmaður hennara, sum tá var smádrongur, fangaði tað. Tað er mangan av tilvild, at gomul orð verða fangað. Í hesum føri snýr tað seg um *eitt* heimildarfólk og *ein* smádrong. Hevði Ásfinn ikki hoyrt orðið og seinni fest tað á blað, hevði hetta merkingarbrigdið helst ikki verið til. Og nettupp tað, at hetta orðið er sjáldsamt, festi í áhugan hjá Ásfinni. Jóhanna hevði eisini kunnað sagt tað við onkran, sum ikki var so áhugaður fyri orðum, og so var føroyskt kanska hetta dømið fátækari. Og kanska skuldi prátið nettupp vera millum hesi bæði fólkini og um Óla, fyri at Jóhanna skuldi velja júst hetta orðið, sum er eitt kensluløtt orð. Tosaði hon við onkran annan, hevði hon kanska valt eitt annað orð, og hevði hon tosað um onkran annan, hevði hon kanska eisini valt eitt annað orð. Tilvildin vildi tað eisini soleiðis, at var Óli ikki innlagdur á Klaksvíkar sjúkrahús, er ivasamt, um orðið yvirhøvur hevði komið fyri í prátinum. Og soleiðis kundu vit hildið á við tilvild eftir tilvild. Ásfinn Sigvardsen greiðir frá, at hann var um 10 ára aldur, tá ið hann hoyrdi hetta orðið einaferð mitt í 1950-árunum[3]. At hetta hevur verið eitt sjáldsamt orð vísir tann seinasti setningurin í brotinum omanfyri: „Veit meg ikki hava hoyrt hasa merkingina aftur."

### Søgan um orðið

Navnorðið *onkur* er ivaleyst eitt gamalt orð í føroysk-um. Svabo hevur hetta orðið við í síni orðabók, Dictionarium Færoense (Matras, 1966), har tað verður skrivað: *Aankur* s. m. *Ynk*, *Elændighed*, *miseria*, *commiseratio S*[1]. Viðmerkingar til orðabókargreinina: Svabo skrivar her stutt *o* sum *aa*; *s* = substantiv (navnorð), *m* = maskulinum (kallkyn); *S*[1] = høvuðshandritið av orðabókini, sum varð gjørt eftir ár 1800, AM 971, 4to (Matras, 1966, inngangur). Tað merkir, at orðið hevur verið brúkt í 1700-árunum, men er eftir øllum at døma farið úr brúki eftir tað, tí tað finst hvørki í orðabókini til Færøsk Anthologi (1891) ella í Føroysk-donsku orðabókini (Jacobsen, Matras, 1927-28). Tað var bara eitt dømi um *onk* í orðaseðlasavninum á Føroyamálsdeildini, áðrenn hetta dømið kom undan kavi, og tað er úr Bíbilsøgu eftir Jógvan Poulsen. Har stendur soleiðis (Poulsen, 1900: 95): „Tá íð Jesus nú sá konuna, tókti honum onk í henni, og hann segði við hana: „Grát ikki!"", t.e. honum tókti hjartaliga synd í henni (Lukas 7, 13). Hetta dømið er skrivað á tveir seðlar, og á øðrum teirra stendur viðmerkt (*eymkr?). Tann, sum hevur skrivað seðilin, loyvir sær at gita, at *onkur* kann hava samband við formin *eymkr*. Upprunafrøðiliga er lítið at ivast í tí. Stjørnan framman fyri *eymkr* merkir helst, at talan er um ein endurgjørdan form, sum ikki er funnin í nøkrum heimildum, men sum úr einum málsøguligum sjónarhorni má hava verið til eina ferð í tíðini. Ein slík hugsan byggir á, at málsøguligar broytingar eru farnar fram í stigum, og at summar av hesum broytingum eru trúligar, tá ið samanborið verður við broytingar í øðrum líknandi orðum.

Hetta orðið *onkur* er tikið við í Føroyska orðabók (Poulsen o.fl., 1998), har tað er markað sum gamalt og sum partur í orðasambandinum *einum tykir onk í onkrum* 'einum tykir synd í onkrum'. Men nú hava vit fingið eitt annað dømi um hetta orðið, har tað ikki verður brúkt í einum orðasambandi, so tann viðmerkingin er nú tikin burtur í Føroyskari orðabók; *gl.* verður standandi.

### Hulduorð

Vit vita ikki, hvaðani Svabo hevði orðið. Kanska hevði hann tað úr vágamáli, kanska úr havnarmáli, kanska var tað kent um alt landið í 1700-árunum. Men tær báðar keldurnar, sum vit í dag hava um hetta orðið, eru frá Gjógv og úr Svínáum, haðani áðurnevndi Jógvan Poulsen var ættaður. Foreldur hansara vóru ættað úr Funningi og av Eiði (Thomsen, 1998). Kanska er talan um eitt bygdarmálsorð úr Norðureysturoy. Føroysk orðabók (Poulsen o.fl., 1998) og tær orðabøkur, ið byggja á leitorðavalið í henni, t.d. *Føroysk-donsk orðabók* (Hansen og Joensen, 2010) og *Føroysk-ensk orðabók* (Skála og Mikkelsen, 2007), hava formarnar *ank* 'eymk, eymkan' og *anka* 'eymka' í orðasambandinum *anka seg* og hjáorðið *ankiliga* 'eymkiliga'. Tá ið eingin framburður er viðmerktur, mugu vit rokna við, at hann er regluligur, t.e. /enk-/ norðanfyri og /ank-/ sunnanfyri. Orðið *ank* er ikki til í orðaseðlasavninum, sagnorðið *anka seg* 'eymka seg' finst bara á einum seðli týtt til danskt 'stønne'. Orðini *ank* og *anka* eru tikin við í ta Føroysk-donsku orðabókina (1961); undir *anka* verður í 1961-útgávuni víst til *eymka*. Hesi bæði orðini eru eisini tikin við í ta Føroysk-donsku (2010), men tilvísingin til *eymka* er av onkrari grund tikin burtur í 2010-útgávuni. Hvørki *ank* ella *anka* finnast í tí Føroysk-donsku orðabókini (1927-28) ella í Anthologiini (1891), og tey finnast heldur ikki hjá Svabo. Orsøkin til hesa fløkjuna er, at formarnir *ank*, *anka* og *ankiliga* eru hulduorð, t.e. orð, sum eru at finna í orðabókum, men sum ikki eru til í málinum, í hesum føri vegna skeivar etymologiseringar (sí *draugorð* í Islex-orðabókini, https://islex.hi.is/). Vit kunnu eisini kalla hesar formar fyri hyperkorrektiónir ella falskar restitutiónir, sum sipa til yvirsystematisering av eini reglu. Slík orð eiga sjálvandi ikki at vera í orðabókum.

> „*Hevði Ásfinn ikki hoyrt orðið og seinni fest tað á blað, hevði hetta merkingarbrigdið helst ikki verið til*"

### Samruni av orðum

Á norrønum finna vit sagnorðið *aumka* og navnorðið *aumkan*, sum við regluligum ljóðbroytingum eru vorðin til *eymka* og *eymkan* á føroyskum. Hesi orð eru avleidd av orðinum *aumr* 'eymur' í merkingini 'ússaligur, ólukkuligur', og tað var júst tað, sum Jóhanna Debes var, tá ið hon tosaði við Ásfinn um sonin Óla, t.e. hon var ólukkulig. Tað norska sagnorðið *anke* verður hildið at vera ein samruni av lágtýskum *anken* og norrønum *aumka* (https://ordbok.uib.no/). Tey donsku orðini *ynk* og *ynke* hava sama uppruna sum *aumka* (Nielsen, 1966: 471). Tað er sjálvandi ein møguleiki, at tey føroysku orðini *ank* og *anka* kunnu vera tøkuorð í føroyskum, men tá tey ikki finnast í teimum gomlu orðabókunum, virkar tað ósannlíkt.

2 Ásfinn Sigvardsen skal hava takk fyri, at hann gav mær loyvi til at brúka tekstin til hesa grein.

3 Persónligt samskifti við Ásfinn Sigvardsen í mai 2021.

**Heimasíður:**
bygdin.fo
https://islex.hi.is/
https://ordbok.uib.no/
https://sedlasavn.setur.fo/WordCards/PublicIndex
https://sprotin.fo/

**Bókmentir:**

Árnason, Mørður. 2007. *Íslensk orðabók*. Edda. Reykjavík.
*Bíblia. Tað er Halgabók*. Gamla Testamenti og Nýggja. Týdd úr frummálinum. 1977. Det Danske Bibelselskab. Keypmannahavn.
Blöndal, Sigfús. 1920-1924. *Íslensk-Dönsk orðabók.* Reykjavík.
Hansen, Zakaris Svabo og Hans Joensen. 2010. *Føroysk-donsk orðabók.* Orðabókagrunnurin. Tórshavn.
Jacobsen, M.A. og Chr. Matras. 1927-1928. *Føroysk-donsk orðabók.* Felagið Varðin. Tórshavn.
Jacobsen, M.A. og Chr. Matras. 1961. *Føroysk-donsk orðabók.* Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn.
Matras, Chr. 1966. Dictionarium Færoense. *Færøsk-dansk-latinsk ordbog.* Munksgaard. Keypmannahavn.
Nielsen, Niels Åge. 1966. *Dansk etymologisk ordbog.* Gyldendal. Keypmannahavn.
Poulsen, Joen. *Bíbilsøga*. Føringafelag í Føroyum [endurpr. Emil Thomsen, 1984]. Tórshavn.
Poulsen, Jóhan Hendrik W., Marjun Simonsen, Jógvan í Lon Jacobsen, Anfinnur Johansen, Zakaris S. Hansen. 1998. *Føroysk orðabók.* Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn.
Skála, Annfinnur í og Jonhard Mikkelsen. 2007. *Føroysk-ensk orðabók.* Sprotin. Vestmanna.
Thomsen, Niels Jákup. 1998. *Føroyskir fólkaskúlalærarar 1880-1997.* Bókadeild Føroya lærarafelags. Tórshavn.


### Kann tulkast øðrvísi

Ein onnur tulking av *ank* og *anka* kemur her. Tá ið vit siga orðið *eymk* og *eymka* verður *m* til *n* í framburðinum, /enk/ og /enka/, altso eitt slag av ljóðlíking sum úrslit av, at ljóðini *n* og *k* liggja nærri hvørjum øðrum enn *m* og *k* (*n* og *k* eru bakgómaljóð). Bókstavaheildin *ank* verður norðanfjørðs vanliga framborin /enk/ t.d. /blenkur/ 'blankur' og /benka/ 'banka'. Tí kunnu vit ímynda okkum, at ein orðabókarhøvundur kann hava brúkt tann øvuta logikkin og sagt sum so, at tá ið eitt orð verður framborið *enk*, stavast tað helst *ank*. Tað kann vera orsøkin til, at *eymk* /enk/ og *eymka* /enka/ hava fingið eitt 'skeivt' *a* sett inn í stavsetingina. Altso eitt slag av hyperkorrektión ella øvutum skriftformi. Ein síðuformur til *eymka seg* er *onka seg*, har ið *o'ið* kann tulkast á sama hátt sum í *onkur*, har broytingin kann hava verið: *eymka* > */emka/* > */enka/* > */einka/* > *onka* (millumstigini verða skrivað við grovari ljóðskrift). Ein onnur tulking kann vera, at *ank*-formarnir í veruleikanum eru *eink*-formar, altso at *ank* skuldi verið skrivað *eink*. Men tann hyperkorrekta tulkingin virkar trúligari, tí tá ið framburðurin av *ank* fellur saman við eymk /enk/, sum tað ger norðanfjørðs, hendir ein følsk restitutión ella skeiv etymologisering av orðinum /enk/ > ank.

### Serføroyskur formur

Tað er lítið at ivast í, at orðið *onkur* gongur aftur til *eymkur*. Men áhugavert er, at *eymkur* ikki er til í norrønum, bara *aumkan*. Tí má *onkur* roknast sum ein serføroyskur formur. Í íslendskari orðabók finna vit orðini *aumkun* og *aumka/aumkva* (Árnason, 2007: 39), men í teirri gomlu íslendsk-donsku orðabókini verða orðini *aumkun* og *aumkan* lýst sum avoldað mál (Blöndal, 1920-1924: 53). Í Islex verður *aumka* lýst sum gamalt, men *aumkun* er als ikki við (islex.hi.is/, leitað 11.5.2021). Tað kundi bent á, at orðini ikki eru serliga vanlig í íslendskum nútíðarmáli.

### Ein møgulig tilgongd

Her kunnu vit royna at seta broytingartilgongdina inn í nøkur stig. Vit kunnu ætla, at hóast *aumkr* ikki er heimilað í norrønum, so má tann formurin liggja undir tí føroyska forminum *onkur*. Ein møgulig tilgongd er henda: *aumkr* > *aumkur* > *eymkur* > *emkur* > *enkur* > *einkur* > *onkur*. Hvør broyting kemur fyrst, *aumkur* ella *eymkur*, er ivasamt, men tað hevur ikki týdning í hesi prófførsluni. Broytingin *enk* > *onk* (við einum millumstigi *eink*) er ein reglulig ljóðbroyting í føroyskum samanborið við norrønt, tí havi eg sett hetta millumstigið inn í broytingartilgongdina. Dømi um broytingina *enk* > *eink* > *onk* hava vit í t.d. *skenkja* > *skeinkja* > *skonkja*, sbr. eisini norr. *engi* (uppr. einn-gi) 'eingin' > *eingin* > *ongin*.

> *„Tá íð Jesus nú sá konuna, tókti honum onk í henni, og hann segði við hana: „Grát ikki!"*

### Samanumtikið

Her verður roynt við málsøguligum prógvum at vísa á, at tað føroyska navnorðið *onkur* 'eymkan' er komið av einum norrønum orði *aumkr*, ið á føroyskum hevði verið *eymkur*, sum í sínum lagi er ein avleiðsla av lýsingarorðinum *eymur* (norr. *aumr*) 'ússaligur, vesalligur'. Í norrønum finna vit bara navnorðið *aumkan* 'eymkan', men vit mugu rokna við, at *aumkr* 'eymkur' hevur verið til, kanska sum síðuformur til *eymkan*. Orsøkin til at vit kunnu siga tað, er, at vit hava orðið *onkur* í somu merking á føroyskum sum norrønt *aumkan*. Hetta sjáldsama dialektorðið er uppskrivað sum talumálsorð frá Gjógv: „Tað er sovorðin onkur at síggja teg." Harumframt er eitt dømi úr skrivaðum máli í Bíbilsøgu eftir Jógvan Poulsen, har hann skrivar: „Tá íð Jesus nú sá konuna, tókti honum onk í henni, og hann segði við hana „grát ikki"", t.e. honum tókti hjartaliga synd í henni. Prógvførslan fyri at kunna siga, at *onkur* gongur aftur til *aumkr* eru nakrar regluligar ljóðbroytingar í føroyskum:

1) Tað norrøna tvíljóðið *au* verður til *ey* á føroyskum
2) Tvíljóðið styttist framman fyri tvey hjáljóð (ey > e)
3) Ljóðsamansetingin *mk* verður assimilerað til *nk*
4) enk > eink > onk.

Víst verður á, at *ank*, *anka* og *ankiliga* eru skeivt stavaðir formar, sum vóru við í upprunaligu útgávuni av Føroyskari orðabók (1998), men sum síðan eru strikaðir. Hesir skeivu formarnir kunnu helst tulkast sum eitt slag av hyperkorrektiónum, sum eru myndaðar út frá norðanframburðinum av a+ng/nk[4]. Um tað ber til at tulka *ank*-formarnar sum framburð av *eink*, er meira ivasamt. Trúligari er broytingin */enkur/* > */einkur/* > *onkur*.

4 Eg takki Eivindi Weyhe fyri góðar viðmerkingar til ank og anka. Eivind Weyhe upplýsti eisini, at ank, anka og ankiliga ikki eru við í rættskrivingarorðabókini, sum er í gerð. Persónligt samskifti 7. mai 2021.



# BÓKMENTA-UMMÆLINI FRAM Í LJÓSIÐ




**Paula Gaard**
paulag@setur.fo
ph.d. í bókmentum
námslektari
Føroyamálsdeilin
Fróðskaparsetur Føroya



Ritgerðin *Verjurøða ummælarans* er ein verjurøða fyri ummælaravirksemi sum heild og roynir at lyfta hetta tekstslag upp til at verða greinað á jøvnum føti við aðrar bókmentir. Tí er tað ein beinleiðis tilverutreyt hjá kritikkinum at vera í verjustøðu. Ummælarin má ofta verja seg, tí rithøvundar halda hann ikki skilja og beinleiðis mistulka bókmentir.

Endamálið við greinini er at leggja dent á, at fleirraddaður kritikkur er týdningarmikil.

Greinin er ein stytt og tillagað útgáva av framløgu í sambandi við verju av ph.d.-ritgerðini *Verjurøða ummælarans* í Kongshøll 19. mars 1921.


**Tann 9. mars 2021** stóð grein at lesa á heimasíðuni barnebokkritikk.no við heitinum „Kritikeren har aldri rett". Heitið bendir kanska ikki á hetta, men greinin er eitt slag av verjurøðu fyri ummælarans virksemi og vísir á týdningin hjá einum fleirraddaðum kritikki, har tað ikki bara eru nakrir fáir einstaklingar, sum ummæla.

Tað var ummælarin Walter N. Wehus, BA í listasøgu, blaðstjóri á norska tíðarritinum um teknirøðir *Empirix*, ið hevði skrivað hana, tí at hann í ummæli í oktober 2020 gav barnabókini *Min ven piraten* eftir Ole Kristian Løyning mønustingin og kallaði hana „en sjarmløs historie med dårlig fantasi", „intetsigende replikkveksling" og „ubehjelpelig språk" (Wehus 2021).

Fáar mánaðir seinni fekk bókin norska kritikerprisen 2021 fyri bestu barna- og ungdómsbók í Noregi í 2020.

Nú áskoðanin hjá Wehus kom í brennidepilin, vardi hann seg og samstundis eisini ummælaran sum heild við at vísa á, hvussu tómt ummælararúmið er vorðið í seinastuni, og at tað, sum skuldi verið ein almenn samrøða um bókmentir, í alt ov stóran mun er vorðið ein einarøða.

Almenna samrøðan er vorðin so fátæk, og hetta er eitrandi fyri ummælaravirksemið, tí tá ið samanum kemur, kann ein ummælari standa einsamallur við sínum ummæli, og við tað fær hann ein leiklut, sum ongantíð var ætlanin, at hann skuldi hava, nevniliga at vera persónurin, ið hevur endaliga svarið. Tann vantandi samrøðan um bókmentir gevur ummælaranum ein skeivan leiklut sum tann, ið hevur rætt.

Endamálið við greinini er ikki at seta niður á ummælaran, tí hann ongantíð hevur rætt, men tvørturímóti at verja ummælaravirksemi sum heild og leggja áherðslu á, at fleirraddaður kritikkur er týdningarmikil.

## Verjuretorikkur

Greinin eftir Wehus er eitt av sera mongum dømum um tað narrativ, ið eyðkennir ummælaravirksemið í Norðurlondum nú á døgum og hevur merkt tað, síðan eg fór í holt við at granska hetta evni á heysti í 2016.

Fleiri dømi eru um, at ummælið sum tekstslag hevur verið merkt av kreppuretorikki, bæði í vísindaligari og serliga journalistiskari skriving hetta tíðarskeiðið, og eyðvitað er at spyrja, hvussu støðan er í Føroyum. Kunnu vit tosa um kreppu í kritikkinum – vit, sum ongantíð hava upplivað nakra gulløld í føroyskum ummælaravirksemi? Ella mugu vit heldur rætt og slætt staðfesta, at hetta, sum í okkara grannalondum verður nevnt kreppa, íkomin av broyttu miðlastøðuni og broyttum valdskipanum í samfelagnum, er og hevur altíð verið ein tilverutreyt í okkara ørlítla samfelag, har ummælaravirksemi altíð hevur ligið á nøkrum fáum eldhugafólkum?

Spurningurin er, um hetta er nakað nýtt. Er tað so, at ummælaravirksemi fyrr hevur havt so góðar tíðir, men nú, síðan miðlastøðan í stóran mun hevur broytt valdskipanirnar í samfelagnum, er fyri hóttafalli?

Svarið er, at hetta er ikki nakað nýtt, tí nógv av tí, sum er skrivað um ummæli gjøgnum tíðirnar, er merkt av verjuretorikki. Kendi og nógv endurgivni enski yrkjarin og kritikarin Matthew Arnold (1822-1888) sigur í „The Function of Criticism at the Present Time“ frá 1865:

> *Øll høvdu eisini verið fús at viðganga sum almenna sannroynd, at tann kritiski førleikin er lægri í virði enn tann uppfinningarsami førleikin. Men er tað satt, at kritikkurin í sær sjálvum er skaðiligur og meinskur; er tað satt, at øll tíð, sum fer til at skriva um verk hjá øðrum, hevði verið nógv betur farin til at skapa upprunaverk av einhvørjum slag? (Arnold 1865/1989:500, egin týðing).*

Hann setur sostatt spurningin, um tað er rætt, at ummælaravirksemi hevur eina lægri støðu enn kreativt skrivivirksemi. Kendi kanadiski bókmentaástøðingurin Northrop Frye (1912-1991) lýsir knapt hundrað ár seinni eisini støðuna hjá ummælaranum sum sekundera og sipar til, at tørvur er á at verja hana:

> *Ein onnur orsøk er til, at kritikkur má til. Kritikkurin kann tosa, og allar listirnar eru málleysar … Skaldskapur er uttanveltað orðanýtsla: hann vendir sær ikki beinleiðis til ein lesara … Grundreglan í kritikki má vera, ikki at skaldið veit ikki, hvat hann/hon tosar um, men at skaldið kann ikki tosa um tað, sum hann/hon veit. At verja rættin hjá kritikki yvirhøvur at vera til, er tí at hava støði í, at kritikkur er ein sjálvstøðugur strukturur av hugsan og vitan, sum hvílir í sær sjálvum, óbundin av listini, sum hann hevur við at gera (Frye 1957/2000:4-5, egin týðing).*

Tað kann tí væl vera, at tað vegna broytta miðlastøðu er íkomin ein kreppa í kritikkinum, men verjustøðan hjá ummælaranum er ikki nýggj, og dagsskráin at vinna tekstslagnum virðing hevur djúpar røtur.

Henda dagsskrá hevur í stóran mun snúð seg um at javnseta ummælaravirksemi við listafólksins virksemi; at tala fyri, at eitt ummæli ikki bara er endurgáva av einum teksti, men hevur potentiali til at vera list í sjálvum sær. Ikoniski teksturin eftir írska skaldið Oscar Wilde (1854-1900) „The Critic as Artist“ frá 1891 orðar hesa dagsskrá.

Her hevur heitið á mínari ph.d.-ritgerð, *Verjurøða ummælarans,* sín uppruna. Heitið vísir ikki bara á hesa grundleggjandi verjustøðu ummælarans, men vísir til arbeiðið hjá mær við hesum evni á fleiri ymiskum stigum:

- at tað er ein tilverutreyt hjá kritikkinum at vera í verjustøðu,
- at ummælarin ofta má verja seg, tí rithøvundar halda hann ikki skilja og beinleiðis mistulka bókmentir. Vit hava nógv dømi úr skaldskapinum um rithøvundar, sum spotta ummælaran,
- at ummælarin má verja seg, tí hann mangan er noyddur at ganga ímóti streyminum og siga ymist, sum er illa dámt,
- at ummælarin má verja seg, so hann ikki endar í somu støðu sum nevndi norski ummælarin Wehus og stendur sum tann, ið fullkomiliga fór skeivur um eitt bókmentaverk,
- Til seinast eitur ritgerðin so, tí hon vísir á, at ummælið sum tekstslag, hóast tað hevur lága tign, er týdningarmikið og valdmikið og eigur at verða kannað sum tekstur í sjálvum sær og ikki bara sum hjálpartekstur í bókmentagransking og bókmentasøguskriving, sum siðvenja hevur verið. Tí er ritgerðin eisini sjálv ein verjurøða fyri ummælaravirksemi sum heild og vil í verki vera við til at lyfta hetta tekstslag upp til at verða greinað á jøvnum føti við aðrar bókmentir,
- Til allarseinast vísir heitið á, at partur av niðurstøðuni av gransking mínari gevur ábendingar um, at ein sterk metatekstlig dimensión er partur av teimum føroysku ummælunum, sum eg havi greinað, og eg havi tulkað tað sum ein hátt hjá teimum føroysku ummælarunum at verja sín rætt at ummæla. Hetta síggi eg sum eitt tekin um eina veiku siðvenju í Føroyum at ummæla,
- Tað, at sjálvt orðið *røða* er komið inn í ritgerðarheitið, er heldur ikki tilvildarligt, tí nógv av tí ástøðinum, sum liggur sum grund undir mínum granskingarspurningum, hevur sín uppruna í klassiskari røðulist.




## At tala fyri ummælinum sum list

At tala fyri ummælinum sum listarligum teksti og at leggja fram gransking av tí sum lið í einari uppraðfesting av ummælinum sum tekstslag og sum granskingarøki hevur týdning:

- tí ummælið er valdmikið tekstslag,
- tí ummælið hevur ávirkan í øllum liðum í bókmentaligu ringrásini,
- tí ummælið kann vera við til at stýra lagnuni hjá einum bókmentaverki,
- tí ummælið kann hava ávirkan á, hvat kemur í bókmentasøgurnar,
- tí ummælið kann vera við til at ávirka, hvør fær mentanarvirðislønir,
- tí ummælið kann vera við til at ávirka, hvør fær mentanarstuðul, starvsløn og gávufæ.

Tí hevur tað avgerandi týdning, at hesi skjøl, sum hava avmarkaða livitíð í bløðum og tíðarritum í sínari samtíð og ikki verða givin út sum bøkur, ið standa á hillunum og verða tiknar fram av og á, verða gjørd til ein livandi og ítøkiligan part av bókmentastovninum og at tey verða granskað. Soleiðis verða tey førd inn í ein samanhang, sum ger tey sjónligari í bókmentakjakinum í samfelagnum, har tey hoyra heima.

## At skapa mentanarligan myndugleika

Ein og hvør, sum vil tosa við myndugleika, noyðist at byggja sær henda myndugleika upp og skapa sær


20 TÍÐINDI Sosialurin

Um blaðlýs og drekkamuns-realismu

**Burtur eftir Bergtóru Hanusardóttir**
**Skaldsøga, 418 bls.**
**Mentunargrunnur studentafelagsins 2006**

UMMÆLI:
*Carl Jóhan Jensen*

**Ein pastisja**

Ketilin stóð útiá, men kókaði tibetur ikki turrur, hóast skerpikjøtið mátti goymast best sum er fær vinkonan barn, so hon noyðist at giftast, men tibetur kókaði ketilin, hóast tað bæði er drúgt og leingi at lesa til lækna, ræðuliga leingi og drongurin svartsjúkari enn nakrantið, fullur og knúskar og skræðir seg, tey føroysku klæðini hjá sær fyri ongum, meðan Donovan syngur donna donna okkurt, men tibetur var mjølk út í temunnin, hóast sjóverkin við Tjaldrinum og stoktar lippur og slagsmál við



*Dømi um bókaummæli í bløðunum frá tíðarskeiðinum, sum Paula Gaard umrøðir. Dømið er úr Sosialinum 19. desember 2006, har Carl Jóhan Jensen ummælir bókina BURTUR eftir Bergtóru Hanusardóttur.*

eina rødd í samfelagnum, sum er serstøk og verður hoyrd.

Tveir granskingarspurningar hava verið snúningsdepil í kanningini. Tann seinni er ein útgreining av tí fyrra: hvussu skapar ummælarin sær mentanarligan myndugleika í tekstinum, og hvussu pallsetur hann seg í tekstinum?

## Vitanarglopp

Í føroyskum høpi er vitanargloppið, sum henda gransking fyllir út, eyðsætt, tí millum lítið og einki er gjørt við at granska ummæli á akademiskum stigi í Føroyum. Onkrar kanningar eru gjørdar av ummælum í føroyskum tíðarritum, men hetta er fyrstu ferð, at ummæli í føroyskum bløðum eru tikin til viðgerðar á skipaðan hátt.

Í einum størri høpi verður við hesari ritgerð lagt aftur at tí, sum higartil er skrivað í Norðurlondum um ummæli, við tað at fyrr hevur fokus í stóran mun verið á journalistiskt og bókmentasosiologiskt sjónarhorn.

Tað bókmentaliga sjónarhornið við fokus á ummæli sum list hevur vissuliga fingið umrøðu fyrr í tekstum eftir t.d. Arnold, Frye, Wilde og aðrar og í Norðurlondum serliga í norskari og svenskari gransking. Hetta er tó eitt sjónarhorn, sum higartil hevur fingið lítla skipaða viðgerð á akademiskum stigi her á landi.

## Tíðarskeiðið 1997-2007

Granskaða tíðarskeiðið er tíggjuáraskeiðið 1997-2007. Hetta er tað best skrásetta tíðarskeiðið viðvíkjandi føroyskum ummælum hjá Landsbókasavninum, og tað er seinasta tíggjuáraskeið, har ummæli vóru avmarkað til bløð og tíðarrit, áðrenn ta stóru broytingina á miðlaøkinum, tá ið Facebook og aðrir sosialir miðlar gjørdu tað møguligt hjá einum og hvørjum at skapa sín egna pall og har siga sína hugsan um bókmentir.

Danski bókmentagranskarin John Chr. Jørgensen (f. 1944) gjørdi í 1999 eina kanning av donskum ummælum um somu tíð, ið kunnu berast saman við míni innsavnaðu ummæli.

Í tí sambandi havi eg víst á, at somu ummælaratypur ganga aftur í Føroyum sum í Danmark um hetta mundið, t.d. *altjóða ummælarin*, *stílummælarin* og *menningarummælarin*.

## Granskingarúrslit

Míni granskingarúrslit avdúka áskoðanir á bókmentir, sum endurspeglast í ummælunum í hesum tíðarskeiðinum, og tað eru serliga trý øki, sum skapa tær størstu ósemjurnar um, hvussu bókmentir skulu metast.

Talan er um feministiska mótvegis antifeministiskari dagsskrá, estetiska mótvegis tjóðskaparligari dagsskrá, og spurningurin, tá ið tað snýr seg um sjálvt málið, í hvønn mun list tekur støði í tí gerandisliga og kann orðast á gerandismálinum ella um hon alsamt skal arbeiða seg undan tí gerandisliga og skapa nýtt listarligt mál.

Fleiri ummælarar í hesum tíðarskeiðinum hava meira og minni eksplisitta feministiska dagskrá í sínum ummælaravirksemi. Henda dagsskrá endurspeglast hjá summum ummælarum í kvoteringum av, hvørji verða ummælt, hjá øðrum ummælarum í beinleiðis tilvísingum til feministisk verk og hjá uppaftur øðrum í einum ráðandi mannligum diskursi. Eisini endurspeglast feministiska dagsskráin í miðlinum, sum ummælt verður í. Her verður hugsað um, at kvinnur skriva um skaldskap eftir kvinnur í *Kvinnutíðindum*. Eitt antifeministiskt mótrák er eisini sjónligt í hesum tíðarskeiði, sum fyrst og fremst verður borið fram eksplisitt, eitt nú við niðrandi hugtøkum sum *drekkamunsrealisma* og *didduyrkingar*, men eisini hómast í ótilvitaðum málburði.

Móttjóðskaparligir streymar hómast eisini í hesum tíðarskeiði. Við tí søguliga veruleika í huga, at nógv hevur verið tosað um, at orsøkin til, at føroyskir ummælarar hava aftrað seg við at bera fram sterkar neiligar virðisdómar um bókmentir, hevur verið ført fram, at føroyskar bøkur hava fingið óuppiborið rós við tí endamáli – við tjóðskaparligari dagsskrá – at dyrka og menna tann føroyska bókmentastovnin kvantitativt og fáa fleiri føroyskar bøkur útgivnar.

Eitt mótspæl til hesa hugsan og hesar fyritreytir verður orðað í hesum tíðarskeiði, har boðið verður til at meta strangliga út frá listfrøðiligum fyritreytum og ikki hava serlig tjóðskaparlig fyrilit.

Í ummælunum endurspeglast eisini, at lið um lið liva í hesum tíðarskeiðinum tvær áskoðanir; øðrumegin, at gerandislig realisma, sum verður skrivað á gerandismáli, ikki kann metast sum list, og hinumegin, at um list yvirhøvur skal spyrjast burturúr, er neyðugt, at leitað verður út um verandi málskipan fyri at skapa skaldskap. Við øðrum orðum endurspeglast í hesari tíðini afturvendandi spurningurin, um list kann og skal halda seg innan siðvenjuna, ella um hugsanir um avantgardu og brot við siðvenjuna er eitt ófrávíkiligt krav til list.

Føroysk ummæli kunnu í stóran mun berast saman við ummæli í øðrum londum, og somu ummælaratypurnar ganga aftur.

*„Tann vantandi samrøðan um bókmentir gevur ummælaranum ein skeivan leiklut sum tann, ið hevur rætt.“*

Eitt fyribrigdi, sum eg ikki havi sæð nógva viðgerð av aðrastaðni, men sum eg havi eygleitt, er, at tað tykist vera eitt sterkt rák í føroyskum ummælaravirksemi hesi árini at hava eina metafunktión í ummælunum.

Viðhvørt er metakritikkurin ein roynd at umbera seg, viðhvørt er hann ein roynd at skapa sær myndugleika og viðhvørt er hann ein háttur at tosa seg sjálvan upp í lag: at hugsa hart um alt tað, sum tú hugsar um, tá ið tú ummælir.

Hetta havi eg tulkað sum eina avleiðing av veikari ummælarasiðvenju, og sum ein hátt hjá ummælaranum at verja sín rætt at ummæla. Hetta havi eg ikki bara eygleitt í tíðarskeiðinum 1997-2007, tí tað sýnist vera ein søguligur tráður og bendir á eina trotmentan í tí føroyska bókmentaalmenninum.

## At enda

Boðskapurin í orðunum, sum eg byrjaði við, at kritikarin ongantíð hevur rætt, er, at tann einstaki ummælarin ongantíð hevur ta endaligu niðurstøðuna um eitt bókmentaverk, og at vit hava tørv á ymiskum ummælaratypum, t.d. rithøvundaummælarum, sum ofta verða hildnir at hava aðra dagsskrá enn at føra eitt verk fram, og sum kanska ikki altíð hava „rein“ motiv. Nógv av júst hesum ummælum eru væl skrivað og eru við til at lyfta tekstslagið og geva tí tign sum skrivað tekstslag. Vit hava eisini tørv á ummælandi journalistinum, ið kanska hevur útbreiðslu, kunning og skjót tíðindi um nýggjar tekstir sum setning fram um at hugsa um góðskukrøv, og vit hava brúk fyri akademiska ummælaranum, sum kanska hevur sum setning at menna góðar lesarar og uppala teir í einari siðvenju heldur enn at fella greiðar virðisdómar.

Verjurøða ummælarans verjir tí ikki nakran einstakan ummælara ella ein ávísan ummælarastíl. Hon er verjurøðan fyri tí fleirraddaða kritikkinum í samfelagnum, har ymiskar ummælatýpur taka lut og supplera hvør aðra. Ein verjurøða fyri samrøðuni um bókmentir í samfelagnum.

## Keldur:


Arnold, Matthew. 1989. „The Function of Criticism at the Present Time“ (1865). *Literary Criticism and Theory.* Robert Con Davis og Laurie Finke (ritstj.). Longman:499-515.

Dam, Rólant. 2017. „Tá ið heimstaðir hugans í ódnini halla. Um kritiskan kapital og almenni í Føroyum“. *Varðin* nr. 84, bind 1:12-26.

Edenborg, Carl-Michael. 2018. „Den vikande kritiken“. *Aftonbladet*. 13. februar. https://www.aftonbladet.se/a/8w01a2 (02.03.2018).

„Et Danmark uden anmeldere“. *Information*. https://www.information.dk/serie/danmark-uden-anmeldere-0 (18.01.2018).

Frye, Northrop. 2000. *Anatomy of Criticism* (1957). Princeton University Press.

Jørgensen, John Chr. 1999. *Sprogblomster i spinatbedet. En bog om kritikersproget.* Keypmannahavn, Fremad.

Kristensen, Nete Nørgaard og From, Unni. 2015. „From Ivory Tower to Cross-Media Personas“. *Journalism Practice:* 1-19.

Larsen, Dag Eivind Undheim. 2017. „Kutter i kritikken“. *Klassekampen*. 11. november. http://www.klassekampen. no/article/20171111/ARTICLE/171119990 (18.01.2018).

Lindqvist, Marit. 2017. „Kulturbevakning: Dagskritiken har minskat med 35% på tio år“. *Yle*. 26. desember 2017. Dagført 4. jan. 2018 https://svenska.yle.fi/artikel/2017/12/26/kulturbevakning-dagskritiken-har-minskat-med-35-procent-pa-tio-ar (11.03.2018).

McDonald, Rónán. 2007. *The Death of the Critic.* New York, Continuum.

Wehus, Walter. 2021. „Kritikeren har aldri rett“. barnebokkritik.no. 9. mars. https://www.barnebokkritikk.no/kritikeren-har-aldri-rett/?fbclid=IwAR3MRAO1gdSKKoONioapgfPYtmHwxTB_SsNZzoBj-Nns-DG0RgNOF_Rk4BPk#.YEerw537RPZ (06.05.2021).

Wilde, Oscar. 1891. http://www.wilde-online.info/the-critic-as-artist.html (12.08.2019).

Zangenberg, Mikkel Bruun. 2007. „Krise og kritik i norden“. *Kritiker* #4 http://www.kritiker.nu/wordpress/krise-og-kritik-i-norden/ (22.08.2018).



# KORONUGRANSKING Á HEILSUØKINUM Í FØROYUM – EIN SAMANDRÁTTUR

Seinasta árið eru nógvar granskingarverkætlanir gjørdar í sambandi við COVID-19. Uml. seks milliónir eru játtaðar til COVID-19-gransking í Føroyum, t.e. ein millión úr Granskingargrunninum, og fimm milliónir eru latnar av føroyskum vinnufyritøkum og útlendskum granskingargrunnum. Av hesum varð uml. 80% latið til heilsugransking og 20% til samfelagsvísindi.

Millum verkætlanirnar er myrkatalskanning, sum varð gjørd bæði á vári og á heysti 2020; kannað varð, hvussu nógv fólk høvdu havt koronu uttan at hava verið greið um tað. Kanningar eru gjørdar av teimum, sum hava havt koronu, við atliti at sjúkugongd og seinárinum. Harumframt eru andevni hjá hesum somu fólkum vorðin kannað við jøvnum millumbilum. Hetta hevur verið gjørt fyri at fylgja gongdini av andevnum í eitt longri tíðarskeið. Eisini eru andevniskanningar gjørdar av teimum, sum í fyrru smittubylgjuni eftir áheitan frá landslæknanum høvdu verið í sóttarhaldi.

Harumframt eru greiningar gjørdar av farsóttargongdini í Føroyum, og hvussu tað við føroysku handfaringini hevur eydnast at minka um koronubyrðuna í Føroyum, og eisini eru árin av COVID-19 á heilsustøðuna hjá áttati ára gomlum føroyingum kannað umframt sálarheilsan hjá føroyskum løntakarum undir COVID-19-átøkunum.

Aðrar kanningar, sum eru í gongd, eru m.a. at kanna samband millum ílegur og sjúkueyðkenni og/ella sjúkugongdina og at lesa arvastreingin á koronuvirusi hjá øllum teimum smittaðu. Felags fyri alla granskingina er, at hon er gjørd í samstarvi millum fleiri stovnar, m.a. Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Landssjúkrahúsið, Fróðskaparsetur Føroya, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Landslæknan, Ílegusavnið og Depilin fyri Heilsu- og Almannagransking.

Vit í Føroyum hava verið við, tá ið nýggj vitan er fingin til vegar. Tá ið tað snýr seg um úrslitini, ið lýsa andevnisgongd í eitt longri tíðarskeið, vóru vit millum tey fyrstu, ið vístu á, at andevni tykjast at halda sær í øllum førum í 12 mðr. Eisini vóru vit millum tey fyrstu, ið vístu á, at fleiri av teimum, sum hava havt koronu, eru merkt av tí langa tíð eftir, at tey hava verið sjúk. Ikki minst hava okkara royndir við handfaring av koronu verið slóðbrótandi.



**Maria Skaalum Petersen,**
maria@health.fo
MSc, ph.d.
lektari
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu